FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 380 Hósdagur 7. desember 2006 15,-

## Bókin um Júst komin út
Vit vóru við til framløguna




# “Føroyskt” flakavirkið opnað í Kina



Síða 20

Vit eru saman við Zakarias Wang í Kina at opna flakavirki við 2.000 arbeiðsfólkum.

# Í 100 ára føðingardegi hjá fiskimanni

Síða 12

Andrias hevur ikki verið nærri tjóðveldinum enn tað sama!




# Á stórhvalaveiði í Suðuríshavinum



Vit endurgeva forkunnugar dagbøkur frá ferðini við “Willem Barendsz” í 1946 við áhugaverdum myndum.

Síða 9




# Valevni leggur FF undir “illgrunasama valskipan”

Vit skjalprógva, at hetta er ágangur móti felagnum.

Síða 3

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**
**- kemur út annanhvønn hósdag**

**100% tryggleika?**





**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

pet ur & pet ur • 320870

**Mobil Oil Føroyar**

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

## Eftirlønarmál:

# Ber væl til at rinda meira inn

Tað er ikki løgið, at eisini fiskimenn eru upptiknir av síni eftirløn, nú hetta mál er so nógv frammi.

Á hesum øki er støðan tann, at allir aðrir sáttmálaløntir bólkar í samfelagnum rinda sína egnu eftirløn. Arbeiðsgevarin vil gjalda so og so nógv fyri tíman ella mánaðin, og so er tað upp til fakfelagið sjálvt at avgera, hvussu nógv av hesi upphædd skal gjaldast sum løn, og hvussu nógv skal fara til eftirløn.

Í veruleikanum eru vit einasta felag, har tað er eydnast at fáa arbeiðsgevaran av sínum parti at gjalda eftirlønargjald. Seinni hava yvirmannafeløgini tó fingið okkara skipan í teirra sáttmála.

Tað er lætt at semjast um, at einsamøll røkkur okkara skipan ov stutt, um bert verður gingið eftir tí, sum sáttmálin inniber. Teir einstøku fiskimenninir kunnu tó sjálvir avgera at gjalda meira inn. So taka teir fyri seg sjálvan ta avgerð, sum feløgini hjá øðrum sáttmálaløntum gera fyri teir. Næsti spurningurin er so, um FF snøgt sagt skal siga, at fiskimenn fáa hendan skattalættan, og síðan áseta, at ein størri partur av honum skal gjaldast til teirra egnu eftirlønarskipan.

Hetta kann lættligast gerast við, at vit, umframt ta skipan, sum vit hava í sáttmálanum, gera eina eykaskipan. Her áseta vit, at antin ein prosentpartur av hýruni ella eitt ásett krónutal skal setast í eina eykaeftirlønartrygging. Størri upphæddin er, tess meira verður at gjalda út, tá brúk er fyri tí.

Eitt annað mál er, at ein skipan sum okkara gevur eftirløn í mun til ta tíð, tann einstaki fiskimaðurin er inni í henni. Tí gevur hon mest fyri teir, sum eru ungir í dag, og minst til teir, sum eru eldri. Hetta er sjálvsagt ikki nøktandi fyri hesar seinnu. Spurningurin er so, um vit í umrøddu eykatrygging eisini skulu taka eitt serligt gjald, sum júst skal vera ætlað teimum, sum fáa minst burturúr verandi skipan.

Tað einasta, vit eiga at hugsa um, er, at tess meira, ið verður gjørt á hesum øki av feløgunum sjálvum, tess meira kann tað almenna gera sær dælt av, at feløgini sjálvi greiða teir tær uppgávur, sum annars skuldu verið almennar.

### Hevur kanska verið skilagott at bíða

Tann størsti vandin er, um politiska skipanin beinleiðis í almennu eftirlønini fer at mótrokna tær veitingar, sum løntakararnir sjálvir útvega sær. Tað skal avgjørt ikki síggjast burtur frá hesum.

Tí hevur tað verið ein logikkur í at bíða eftir, hvat politisku myndugleikarnir vilja. Tað eru tíggjutals ár, at bíðað hevur verið eftir teimum, meðan teir ferð eftir ferð hava boðað frá, at ein politisk loysn er beint fyri framman - uttan at nakað er hent. Løgmaður hevur fyrr í ár bedýrað, at tann politiska loysnin skuldi koma í hesi tingsetuni, har seinasta framløgufreistin er fyrst í mars. Hendir hetta, so vita vit innan eitt hálvt ár, hvussu støðan er. Tástani meta vit, at feløgini kunnu stinga endaligu kósina út í kortið.

Tíðindi frá Amnesty International

# Altjóða mannarættindadagur

10. desember er altjóða mannarættindadagur og Amnesty International Føroya deild ger sum vant vart við dagin á ymsan hátt.

Fríggjadagin 8. og leygardagin 9. desember fer Amnesty at hava kunningar- og sølubásar á Torginum í SMS og í FK í Hoyvík, har høvi verður at keypa ljós, postkort, blusur og aðra Amnesty vøru.

Sunnudagin 10. desember skipar Amnesty fyri stórari konsert á Tjóðpallinum í Tórshavn kl. 15:00. Høvuðsnavnið á konsertini er Maria Guttesen, sum hevur hópin av dugnaligum gestum við sær: James Olsen, Malan Thomsen, Unn Paturson, Rókur Jacobsen, Tór Verland Johansen, Sigrey Rasmussen, Andreas Restoff, Gunnar Guttesen og Brandur Jacobsen.

Amnesty International heitir á hvørjum áramóti á fólk um at senda stuðulsheilsanir til fangar og mannarættindastríðsfólk kring heimin. Heilsanirnar kunna birta nýggja vón og somuleiðis hava við sær, at fólk verða leyslatin.

Heilsanirnar í ár kunna sendast til:

Munkin Thich Huyen Quang, ovasti leiðari í óalmennu Buddhistisku Kirkjuni í Vjetnam (UBCV), sum hevur verið í húsavarðhaldi síðani 1982 uttan ákæru ella dóm.

Kristnu evangelistarnar Haile Naizgi, Kiflu Gebremeskel og Tesfatsio Hagos, sum sita fongslaðir í Eritrea vegna teirra átrúnað.

Mutabar Tanzhibaeva, sum leiðari í mannarættindafelagsskapinum Fiery Hearts Cub í Uzbekistan, sum situr fongslað vegna sítt mannarættindaarbeiði.

Chen Guangcheng, sum situr fongslaður í Kina vegna sítt arbeiði til frama fyri at hjálpa lokalu íbúgvunum at føra rættarmál móti myndugleikunum.



**MASKINMEISTARI TIL NORRÖNU**

Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Smyril Line søkir eftir 2. maskinmeistara til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu skipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferðafólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til 2. maskinmeistara:**
- Fulla maskinmeistaraútbúgving við í minsta lagi STCW áteknaðum vinnubrævi sum skipsmaskinmeistari av 1. stigi
- Heilsu-, sløkkileiðara-, roykkavara- og trygdarprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevnir.

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið.

Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir frá størri skipum, men hetta er eingin treyt.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 10. desembur 2006.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til financial controller á:

+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

## Dan R Petersen:

# Sáar uttan grundarlag iva um valskipanina hjá FF

**Í síni herferð móti FF er Dan R. Petersen nú farin at sáa iva um, hvørt formansvalið í Fiskimannafelagnum verður skipað á ein regluligan og demokratiskan hátt.**

Í okkara verð er tað grundleggjandi, at eingin ivi skal vera um, at eitt val gongur fyri seg á ein rættan hátt. Tískil er tað eisini eitt álvarsmál at leggja nakran sum helst undir nakran form fyri “illgrunasama valskipan”.

Men hinvegin kann sigast, at kann tað ikki undirbyggjast, skuldi hetta verið eitt álvarsmál fyri tann, sum setur fram slíkar skuldsetingar.

Hjá okkum er nóg mikið at vísa til fakts í málinum, sum vísa, at tað er ikki minsta grundarlag fyri hesum illgitingum.

Tað er avdúkandi fyri innlitið hjá Dan R. Petersen í hetta mál, at hann nevnir bert viðtøkurnar hjá FF frá 1980 í síni illgiting móti sitandi formanni.

Tað minsta innlit í felagsviðurskifti vísir, at eitt felag, sum er stovnað í 1911 hevur havt viðtøkur undan 1980. Uttan at hava sammett viðtøkurnar undan og eftir formansskiftið í 1971, ber als ikki til at gera nakra niðurstøðu um avleiðingarnar av verandi viðtøkum. Men her er ikki minsta kanning gjørd. Ein slík vildi eisini oyðilagt niðurstøðuna.

Men henda sammeting verður gjørd í næsta teigi:

### Viðtøkur felagsins frá 1. januar 1939

Her skal tilskilast, at valskipanin hevur verið galdandi síðan 1931

Til felagsformansval hevur hvør sýsla rætt til at stilla upp ein mann.

Tá uppstillað er til felagsformansval, senda sýsluformenninir óupphaldiliga til skrivstovu felagsins skrivligt skjal, sum týðiliga vísir, hvør ið uppstillaður er í sýsluni.

Valið fer fram á tann hátt, at hvør limur fær ein stemmuseðil, har nøvnini á teimum uppstillaðu eru prentaði. Hann setur so kross við navnið á tí manni hann velir og undirskrivar seðilin við sínum fulla navni og bústaði….

Sóknarformenninir við tiltaksmonnum stjórna øllum valum. Tá atkvøðugreiðslan er liðug í sóknini sendir sóknarformaðurin óupphaldiliga …seðlarnar innaftur til skrivstovu felagsins.

Atkvøðisgreiðslan kann ikki standa uppá meira enn 48 tímar í hvørji sókn, og seðlarnir mugu vera komnir aftur á skrivstovu felagsins innan 30. dagin eftir, at teir eru útsendir til sóknarformannin.

Við …. felagsformansval skal atkvøðugreiðslan vera skrivlig og opinber.

Her síggja vit í fyrsta lagi, at í 75 ár hevur mannagongdin við uppstilling verið tann, at fráboðan um valevni hevur verið send skrivstovu FFs. Øll hesi árini er tað neyvan komið fyri, at ivamál hevur verið sett um hetta hvørki frá taparum ella vinnarum. Tað er í hvussu er ikki komið fyri seinastu 40 árini.

Tað kann nevnast, at t.d. Starvsmannafelagið, sum hevur líknandi mannagongd við uppstilling sum FF, hevur somu skipan sum vit á hesum økinum. Nevniliga at uppstilling verður fráboðað felagnum. Tískil er einki grundarlag fyri at leggja sitandi formanni undir at hava “uppfunnið” hesa mannagongdina.

### Viðtøkur felagsins frá 1980

Viðtøkurnar frá 1939 eru broyttar í 1973, eftir at sitandi formaður varð valdur. Í 1980 varð samtykt eitt ískoyti um Sjómannadeild.

Nýggju reglurnar fyri val eru hesar:

**Uppstilling og val**

Við val av felags- og sýsluformonnum hevur hvør sókn rætt til at stilla upp ein mann.

Við val av felagsformanni hava eisini limirnir á teim skipum, sum eru burtur, tá uppstillingin fer fram, rætt til at stilla upp ein mann. Maður er uppstillaður sum felagsformansevni, um 5 sóknir-/skipsmanningar skjóta hann upp.

Valini eru loynilig og fara fram eftir reglum, sum felagsstjórnin ásetur. Skipast skal so fyri, at limir, sum eru burtur, meðan valið fer fram, skulu hava høvi at greiða atkvøðu.

Atkvøðuseðlar verða sendir til grannskoðara felagsins, sum telur atkvøðurnar upp.

Tað er rætt, at sitandi formaður var arkitekturin aftanfyri hesar nýggju reglur. Endamálið var fyrst og fremst at fáa greiðar reglur og síðan at fáa reglur, har fiskimenn kundu fáa betri møguleikar bæði at stilla upp og velja

Broytingarnar í mun til undanfarnu viðtøkur vóru hesar:

1. Manningar á skipum fingu møguleika at stilla upp. Frammanundan vóru tað bert sóknir og sýslur.

2. Meðan atkvøðuseðlarnir fyrr skuldu sendast til skrivstovu FFs, skulu teir nú sendast til grannskoðara felagsins, og valini skuldu vera duld, har tey fyrr ikki vóru tað.

3. Tað er beinleiðis ásett, at menn, sum eru burtur, skulu hava høvi at velja, og tí er freistin at velja longd eina 1 mánað frá 1. januar til 1. februar.

## Niðurstøða:

# Veruleikin er tann mótsetti av tí, Dan R. Petersen førir fram

Valið verður annars avgreitt eftir reglugerð, sum er samtykt av felagsstjórn felagsins, og tað verður skipað í neyvum samstarvi við grannskoðara felagsins.

Vit halda tað ikki vera neyðugt at koma inn á øll tey dømi, har Dan R. Petersen roynir at skapa iva um valið. Tað er óneyðugt at vísa til meira enn hesa reglu í greinini:

*“Felagsins lógir eru frá 1980. Formaður tá var Óli Jacobsen, sum sjálvandi var arkitektur fyri hesi ivasomu valskipan, sum avgjørt gevur sitandi formanni stórar fyrimunir”.*

Tað er hervið dokumenterað, at hetta er ikki bert beinleiðis ósatt. Sannleikin er tann beint mótsetti. Tað er júst takkað veri viðtøkubroytingum í skeiðnum hjá verandi formanni, at Dan R. Petersen kann stilla upp til felagsformansvalið í ár.

Sannleikavirðið í hansara grein er sum heild tað sama sum í hesum døminum.

## Í grein í bløðunum í seinastu viku skrivar Dan R. Petersen:

# Illgrunasom valskipan

Mítt mótvalevni liggur nú inni við mínari uppstilling og sær, hvørjir stillararnir eru. Eg havi fingið váttað móttøkuna, men havi ikki fingið váttað, um uppstillingin er í lagi, men tað fari eg at krevja, áðrenn freistin er úti.

Hetta svarar til, at var løgtingsval, so skuldu allir teir politisku flokkarnir latið sínar listar inn til tann eina, lat okkum siga Miðflokkin til góðkenningar. Ein løgin mannagongd. Eg meti tað sera óheppið, at mítt mótvalevni skal kenna mínar stillarar, sum ongin annar kennir uttan sóknarformaðurin her í økinum.

Tað er tankavekjandi, at longu nú hevur ein manning (mínir stillarar) fingið ábreiðslu frá sínum reiðara fyri at hava skotið eitt annað valevni upp enn Óla. Hvør hevur likið? Og hví man hesin reiðarin hava áhuga í at hava Óla sitandi?

Eg føli meg eisini sera ótryggan við, at tað er umsitingin hjá mínum mótvalevni, sum ger vallistan, t.v.s. avger, hvør sleppur at velja og sendir atkvøðuseðlarnar út. Alt hetta átti grannskoðarin hjá F.F. at tikið sær av, sjálvandi.

Felagsins lógir eru frá 1980. Formaður tá var Óli Jacobsen, sum sjálvandi var arkitektur fyri hesi ivasomu valskipan, sum avgjørt gevur sitandi formanni stórar fyrimunir.

Hetta eru ikki einastu fyrimunir, sitandi formaður hevur. Onkran annan ódemokratiskan fyrimun hevur hann tiltuskað sær, men tað vendi eg aftur til, tá eg fortelji frá vitjanini, eg hevði hjá honum, og eg als ikki var vælkomin.

Allar felagsins lógir skulu endavendast eftir vaktarskiftið.

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

Maskinmeistarafelagið hevur aðalfund í mars mánaða 2007. Nærri verður lýst seinni.

**Nevndarval**

Til tess, at virknir limir, ið ikki kunnu møta á aðalfundinum, kunnu velja við brævatkvøðu, ber til at seta fram uppskot til nevndarlimir og skulu tey vera felagnum skrivliga í hendi í seinasta lagi 15. desember 2006.

Tó kunnu uppskot til nevndarlimir eisini skjótast upp á sjálvum aðalfundinum.

**Formansval**

Á komandi aðalfundi verður formansval á skránni.

Uppskot til formansvalevni skulu vera nevndini í hendi áðrenn 15. desember 2006.

*Nevndin*



# Meira um kryvjimaskinur

Í seinasta blaði greiddu vit eitt sindur frá okkara leikluti, tá kryvjimaskinur komu umborð á partrolararnar.

Her skal vera gjørt okkurt ískoyti. Tað, sum hendi við partrolarum, var, at fyrst í nýggju øldini fór veiðan av upsa munandi upp í nøgd. Afturat hesum varð upsin sera smáttfallandi, og hetta merkti ein uppá seg enn størri vøkstur í fiskatalinum.

Hetta var beint í stríð við metingarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni, sum bert fá ár frammanundan hevði mælt til ógvuslig tiltøk fyri at verja upsastovnin móti týning.

Úrslitið gjørdist - sum kunnugt - at menn stóðu undir deyða og kruvdu í samdøgur og settu harvið allar hvíldarreglur til viks.

Hetta var beinleiðis orsøkin til, at Fiskimannafelagið segði sáttmálan við Reiðarafelagið at fara úr gildi 1. desember 2003. Av ymiskum orsøkum drógu samráðingarnar út, so tað var komið fram til 3. mars, áðrenn nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður.

Fremsta kravið var, "tiltøk fyri at tryggja fiskimonnum, at lógarásetta hvíldartíðin verður hildin."

Her var serliga hugsað um hesa støðu við tí nógva upsanum. Reiðarafelagið vísti fyrst til ta loysnina, sum var lættast hjá teimum, nevniliga at koyra meira fólk umborð á skipini. Hetta hevði minkað um eina frammanundan lága inntøku.

Vit vístu til kryvjimaskinur og høvdu uppskot um hægri prosentpart til skip, sum ikki høvdu kryvjimaskinur. Hetta varð tó avvíst.

Viðvíkjandi kryvjimaskinum var tann trupulleiki, at trolarar høvdu havt kryvjimaskinur umborð frammanundan. Men tær kruvdu ikki nóg væl, og virkini vildu ikki hava fiskin, og maskinurnar vórðu koyrdar í land aftur.

Hetta spøkti framvegis undir samráðingunum, og virkini søgdu seg vilja geva fitt minni fyri maskinskruvdan fisk enn fyri hondkruvdan, tí úrtøkan var so nógv minni.

Vit royndu at kanna málið, og eitt úrslit var endurgivna greinin, sum stóð í FF-blaðnum 12. februar 2004. Vit vóru eisini í samband við danskar keyparar av føroyskum upsa frá teimum størru trolarunum, sum kruvdu við maskinu. Her søgdu teir, at úrtøkan var umleið 1% minni í flaki enn við hondkruvdum fiski. Men tað at fiskurin kom so nógv fyrr í ís gav ríkiliga hetta tapið aftur.

Tá ov lítið hendi at fáa skil á hesi støðu, søgdu vit aftur sáttmálan at fara úr gildi 1. desember 2005. Tá vórðu tær fyrstu kryvjimaskinurnar bílagdar, og framhaldið av hesi frásøgn var í seinasta blaði.

Her vístu vit aftur tað, sum Dan Reinert Petersen hevur ført fram um okkara leiklut í hesum máli.

12. februar 2004 kom FF við sínum boði uppá at loysa trupulleikan.

Vekraðir fiskimenn:

**Loysnin er kryvjimaskinur**



**Knívarnir mugu vera hvassir**

**Roynast væl í Føroyum nú**

Nýggjur sáttmáli gjørdur við Reiðarafelagið:

**Lógásetta hvíldartíðin skal haldast**

Tann 3. mars undirskrivaðu Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag nýggjan sáttmála.

Hann var upprunaliga uppsagdur at fara úr gildi 1.desember, men varð seinni framlongdur til 15.januar. Tað er nú ikki altíð so lætt at fáa savnað eina nevnd av siglandi monnum, so fyrsti fundur var júst 15. januar, har FF legði síni sáttmálauppskot fram. Hesi uppskot kundu bólkast soleiðis:

a) Tiltøk fyri at tryggja fiskimonnum at lógásetta hvíldartíðin verður hildin.
b) Ábøtur á sáttmálar fyri einstakar veiður, har vit mettu tørv vera á tí.
c) Dagføring av t.d. inngjalding til eftirlønarskipanina. Hóast tað ikki var talan um stóra upphædd, var tað týdningarmikið at fáa staðfest, at inngjaldingarnar skulu fylgja lønargongdini í samfelagnum.
d) Vit vildu eisini hava sáttmálan greiðari á ávísum økjum út frá tí sjónarmiði, at ein greiður sáttmáli er besti háttur at fyribyrgja trætum.

Semja var so um, at sáttmálin framvegis var í gildi, meðan samráðst var. Tær endaligu samráðingarnar vóru 25. og 26. februar og so 3. mars, og tær endaðu so við tí úrsliti, sum vit mettu vera møguligt, tá hugsað verður um umstøðurnar í fiskivinnuni.

Viðmerkingar til teir ymisku partarnar í semjuni eru hesar:

**Hvíldartíðin**

Her høvdu vit í fyrsta umfari ymisk ítøkilig uppskot um, hvussu tað kundi tryggjast, at hvíldartíðin verður hildin, sum t.d. at hækka býtisprosentið á partrolarum, sum ikki nýttu kryvjimaskinu. Hetta kundu vit tó ikki koma ígjøgnum við nú. Men størsta frambrotið er, at Reiðarafelagið nú hevur viðurkent, at tað eisini er teirra ábyrgd, at hvíldartíðirnar verða hildnar. Hetta kann so skapa tørv fyri, at tað verða gjørdar tøkniligar loysnir á hesum øki.

Men tað skal eisini undirstrikast, at FF - og eisini fiskimenn sjálvir - eiga at hava sína ábyrgd her. Henda ábyrgd er, at tað skal ikki loysa seg at seta heilsuna í vága fyri at fáa uppi lastina nakrar tímar fyrr, enn tað annars vildi tikið.

Tí fer FF eisini at gera eitt arbeiði á hesum øki. Í fyrsta umfari verður skriv sent til reiðarar/skiparar, sum eisini verður sent umborð, har tað verður víst á tað protokollat, sum feløgini hava gjørt.

Ætlanin er eisini at hava fund við Føroya Skipara- og Navigatørfelag fyri at tosa um, hvussu yvirmenn umborð kunnu medvirka.

Vit fara at seta eina kanning í verk av arbeiðstíðini umborð. Hetta kann verða gjørt grundað á dagbøkur og døgnlistar. Men eisini við, at spurnaðarbløð verður sent umborð, har spurt verður, hvussu langa frívakt menn hava havt dag um dag.

11. mars 2004 var hendan greinin prentað í FF-blaðnum.

## Landsfundurin verður 29. desember 2006

Landsfundur FFs verður aftur í ár sum vanligt í Norðurlandahúsinum. Fundurin verður 29. desember og byrjar kl. 10.

Skráin verður tann, sum vit plaga at hava til landsfundir sum ársfrágreiðing, roknskapur, limagjald v.m.

Vit plaga eisini at hava ein gest at greiða okkum frá viðurskiftum, sum hava týdning fyri fiskimenn. Í ár verður tað Helgi Nolsøe, sum arbeiðir á Fiskirannsóknarstovuni. Hann fer at greiða frá tøkni, sum kann gera tað arbeiðið lættari og tøkni sum kann gera tað at meira kemur burtur úr.

Landsfundurin verður skipaður av sóknarformonnum, men fiskimenn yvirhøvur eru vælkomnir.

## Klaksvíkingur hevur uppfunnið nýggjan línukastara

- Sum sjómaður havi eg ofta upplivað, at skip hava siglt ógvuliga nær hvørjum øðrum, tá línan til partroling skal tveitast millum skip. Og tað hendir seg meira enn so, at skip bera við hvørt annað.

Tað sigur klaksvíkingurin Andras Samson, sum hevur uppfunnið ein nýggjan línukastara. Við hansara uppfinnilsi verður línan kastað við sera lítlum trýsti, og er tí tryggari at nýta. Eisini er hon gjørd úr tilfari, sum tolir alt veður og vind.

Andras Samson hevur arbeitt við línukastaranum síðsta árið. Nú er komið á mál, og eisini eru allar góðkenningar komnar uppá pláss. Partafelagið Vónin, sum hevur høvuðssæti í Fuglafirði, skal taka sær av søluarbeiðinum.



# Tá baptisturin Poli í Dali var í barsil í 1911

Ein stuttlig søga í seinasta blaði var í tí partium av frásøgnini hjá Andreas í Tarti, har hann fortelur um barslið hjá Georg L. Samuelsen í 1911. Tá var Georg var eitt ára gamal. Men hann var tá longu doyptur. Hann var nevniliga so ússaligur, tá hann varð føddur, at hann varð heimadoyptur. Tá verður minst møguligt gjørt burturúr. Tá krevst bert, at tann sum doypir sjálvur er barnadoyptur og at trý vitni eru til staðar.

Seinni kann barnið fáa sín dóp váttaðan í kirkjuni, har tað kann fáa gummur og gubbar og annað, sum hoyrir til ein "rættan" dóp.

Barslið hevur so verið í Havn, hóast Andreas Samuelsen varð settur sum sýslumaður í Fuglafirði í 1910. Hetta árstal avdúkar annars eitt mistak, sum bæði er í Løgtingssøguni og 100 ára ritinum hjá Sambandsflokkinum. Her stendur, at Trygvi Samuelsen er føddur í 1907 í Fuglafirði. Hetta var áðrenn Andrass fór til Fuglafjarðar, og Trygvi er neyvan føddur har.

Um fadrarnar kann verða nevnt, at "Hr Skaalum" var Oluf Skaalum, sum var blaðstjóri á Dimmalætting. Ein gumma var "Gigga". Hon var kona Johan Danielsen, postmeistara, og var dóttir Søren Müller. Ein heldur óvæntaður gestur við umrødda barsil var Napoleon Andreassen, Poli í Dali, og konan. Orsøkin til, at tey vóru við, mundi vera, at Beate, mamma Georg, og Poli vóru systkinabørn. Tey eru í ætt við 100 ára gamla Oskar Jensen í Íslandi, ættaður úr Skopun, sum vit høvdu eina frásøgn um í summar.

Men samstundis var Poli ein av teimum fyrstu, sum vóru í Brøðrasamkomuni. Sjálvt í dag, nærum 100 ár seinni, ganga "baptistar" treyðugt til hendingar sum barnadóp og konfirmatión. Tað má hava verið upp aftur meira óvæntað tá. Hetta sigur, at Poli man hava verið sera tolerantur á hesum økinum.

### Poli er partur av okkara sjóvinnusøgu

Poli hevur annars eina áhugaverda søgu, eisini sæð út frá einum siglingarsøguligum sjónarmiði.

Hann var føddur 25. mars 1868. Sum ungur var hann harður mótstøðumaður av tí, sum gamli Sloan stóð fyri, og hann plagdi - saman við øðrum - at órógva útimøtini hjá honum á Doktaragrund. Hann fór út at sigla sum ungur, og 20 ára gamal varð hann umvendur. Tá hann kom heim aftur gjørdist hann ein tann fremstu stuðulin hjá teirri tá nýggju og lítlu brøðrasamkomuni.

Poli gjørdist ein av okkara fremstu slóðbrótarum eins og beiggin Jens var tað. Hann byrjaði at sigla við fiski til Hollands, og í 1906 varð hann biðin um at standa á odda fyri ein fiskirannsóknarferð til Grønlands. Eisini royndi hann trolveiðu undir Føroyum við "Atlantu", og mundi hetta vera fyrsta trolroyndin undir Føroyum. Fyri síni avrik gjørdist hann riddari av Dannebrog, tá Fríðrikur 8. vitjaði í Føroyum í 1907.

Hann var eisini ein av undangongumonnunum, tá mjólkaforsýningin varð sett á stovn í 1908, og fyrsta mjólkasølan var í húsinum hjá Pola, Arnes Minde, sum er niðast í Bringsnagøtu móti Fiskimannafelagnum og beint við dómkirkjuna.

Men Poli gjørdist ikki gamal maður. Várið eftir umrødda barsil, í 1912, fór hann til Íslands við skipi sínum "Olivia", uppkallað eftir konuni. Áðrenn hann fór avstað, var hann inni hjá William Sloan at siga farvæl, og hetta mintist Andrew, sonur gamla Sloan, væl. Poli ætlaði, at hetta skuldi vera hansara seinasta ár á sjónum, so skuldi hann fara at starvast á landi.

Tann 9. mars 1912 legði hann frá landi við 14 røskum monnum umborð. Um páskirnar komu teir inn á Reykjavík, og Poli talaði trý kvøld uppí slag í Frelsunarherinum. Teir fara út aftur, og nakrar dagar eftir brestir eitt herviligt ódnarveður á, og einki hoyrdist aftur frá teimum.

Olivia, kona Pola, var donsk. Tey bæði áttu 9 børn. Tann elsti kallaðist Arne, og hann doyði ungur. Húsið Arnes Minde er tískil uppkallað eftir honum.

### Ein dóttir gjørdist vakurleikadrotning og livir enn

Tá Poli var deyður, flutti konan til New Zealands við øllum - ella í hvussu er teimum flestu børnunum.

Tað áhugaverda er, at ein dóttir livir enn, 95 ára gomul. Hon eitur Vilborg, og verður kallað Billy, og hon er gift Warren. Sum ung gjørdist hon vakurleikadrotning í New Zealandi, har hon enn býr. Hon hevur framvegis samband við ættina í Føroyum, og einaferð fyrst í 70-unum var hon saman við manninum John í Føroyum í eitt hálvt ár. Tá búðu tey hjá Margrethu, systir Georg, í Fuglafirði. Tær báðar vóru trýmenningar.

Hetta er so ein søga, sum kundi fáast burtur úr einum slíkum barsli.



*"Olivia"*



*Vilborg og John*

## Fiskimaðurin og ÚF

Jóhann Mortensen sigur í aftursvari til mín, at teir hvørki stuðla Óla Jacobsen ella Dan R. Petersen. Sum svar til hetta, vil eg siga, at um vilji var frá ÚF, so var eg fyri langari tíð síðani sloppin at svara bakbitinum. Men vit fiskimenn eru ikki kløkkir av hesum, tí vit meta, at hetta er ein liður í tí sera ágangandi politikki, sum eitt nú ÚF hevur ført móti okkum fiskimonnum. Hví sigi eg so? Í áravís hava persónar og samfelagsbólkar lopið á okkum í ÚF, uttan at ein fiskimaður er sloppin at svara aftur. So kann ein spyrja, er hetta trongskygni ella bevíst frá ÚF? Er hetta góður Public Service siður? Eitt er so heilt vist, og tað er, at fiskimenn føla seg ofta illa viðfarnar í ÚF.

Eg meti enn sum áður, at hetta var eitt tilrættislagt álop á meg persónliga av ÚF og Dan R. Petersen, lærara og varamanni á tingi fyri Javnaðarflokkin. Haldi meg við vissu kunna siga, at Dan R. Petersen hevur tætt tilknýti til ÚF. Tí fekk eg eisini fleiri ávaringar um, at Dan R. Petersen fór at nýta ÚF sum pall í valstríðnum, og at eg fór at blíva útihýstur og verða fyri vanbýti. Hesir spádómar komu til sjóndar so at siga beinanvegin.

Tað tykist, sum um bæði ÚF og Dan R. Petersen halda okkum fiskimenn vera býttar og gloymskar. Men vit vita, hvat tit standa fyri, og tí fara vit ikki at lurta eftir tykkara propaganda. Tað sær eisini út til, at stórur partur av føroyingum hevur lúrt einvegis tíðindaflutningin hjá ÚF av, tí bara 3,6 % eru væl nøgd við fjølmiðlarnar, og har er ÚF tann stóri syndarin.

Vit fiskimenn eru troyttir av at verða hildnir aftur. Vit eru troyttir av at verða lagdir undir bæði líkt og ólíkt, tí ein stórur partur av tí er uppspinn og beinleiðis lygn. Tað, vit ynskja, er at fáa ta trygd og løn vit hava uppiborið fyri tað ómetaliga harða stríðið fyri føðilandiðBB, sum hvør fiskimaður útinnir. Tað skal vera nú. Ikki um 3 ár.

*Jan Højgaard*

## Jóhann Mortensen avsannar ikki, at samband er millum Dan R. Petersen og Útvarpið

Jóhann Mortensen avsannar ikki, at samband er millum ÚF og Dan R. Petersen. Hann sigur, at Dan R. Petersen ikki hevur samband til tíðindadeildina. Tað hevði verið gott, um Jóhann Mortensen so hevði kunnað sagt okkum, hvat fyri samband var millum ÚF og Dan R. Petersen. Tí fari eg at spyrja Jóhann Mortensen, hvat fyri samband er ella hevur verið millum ÚF og Dan R. Petersen. Also, hevur Dan R. Petersen havt nakað við ÚF at gera, eitt nú nevndararbeiði ella so?

Eini ráð til ÚF, tit eiga at gera sum SVF. Fyri ca. 3 árum síðani var herviligur ágangur móti sjómonnum. Tá spurdi SVF ein av manningini av einum trolara um viðurskiftini umborð. Hesin maðurin segði síðani, hvussu støðan var umborð. Tað var nakað heilt annað enn tað "Prognombólkurin Móti Fiskimonnum" førdi fram.

Tað skuldi verið rættiliga einfalt Jóhann Mortensen.

*Jan Højgaard*

FFbláðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
www.fiskimannafelag.fo

Tíðindaskriv



*27. januar sleppa dansiglaðir føroyingar at svinga saman við songfuglinum Kikki Danielsson og øðrum góðum fólki.*

# Stórfingið dansikvøld við Kikki Danielsson og Kjell Roos

27. januar bjóðar Róðrarfelagið Knørrur í Havn øllum føroyingum til stórfingnan dans við svensku stjørnunum Kikki Danielsson og Kjell Roos og okkara egnu Vestmonnum

Nú kunnu allir dansiglaðir føroyingar gleða seg, tí leygarkvøldið 27. januar verður stórfingið dansikvøld í ítróttarhøllini á Hálsi við Kikki Danielsson og Kjell Roos. Saman við teimum fara Vestmenn - garantarnir fyri føroyskum kontritónleiki - at spæla síni vælkendu og svingandi løg, so lagt er upp til eitt dansikvøld av teimum heilt stóru.

Kikki Danielsson er millum kendastu svensku sangstjørnurnar nakrantíð og hevur spælt við fleiri orkestrum, umframt at hon eisini hevur verið solo. Millum kendu løg hennara eru Dag efter dag, Bra vibrationer, Papaya Coconut, Sången skall klinga og Vem é dé du vill ha.

Kikki er heldur ikki hvør sum helst, tá ið tað kemur til at standa á palli, og hevur fingið fleiri virðislønir fyri sín fólkakæra tónleik og góðu framførslur. Við sær til Føroya hevur Kikki orkestrið hjá sær, sum er mannað við so garvaðum monnum sum Kjell Roos, gittar og sang, Kent Loven, trummur, Anders Roos, bass og sang, og Daniel Wirnberg, tangentar.

Eisini Vestmenn stilla upp við sterkastu manning, so borðreitt verður við sjelarum og svingtónleiki av allarbesta slagi. Og vil ein hvíla seg eina løtu, verður høvi at seta seg við hugnalig borð til kæti og prát. Óivað verður hetta eitt kvøld í stuttleikans og kærleikans tekni.

Róðrarfelagið Knørrur, sum leggur lunnar undir kvøldið, vónar, at fólk fær eitt hugnaligt kvøld saman. Avlopið frá tiltakinum fer alt til nýggja neystið hjá felagnum, sum væntandi verður farið undir at byggja um stutta tíð.

Forsølan til dansikvøldið er longu byrjað. Atgongumerki fáast í bensinstøðum kring landið. Væntað verður, at nógv fólk kemur saman, so tey, sum vilja tryggja sær atgongumerki, hava høvið at keypa sær tað í góðari tíð.

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

# Felagsformansval

Í ár er felagsformansval í Føroya Fiskimannafelag. Um uppstilling og val sigur lóg felagsins:

*Við vali av felags- og sýsluformonnum hevur hvør sókn rætt til at stilla upp ein mann. Við vali av felagsformanni hava eisini limirnir á teimum skipum, sum eru burtur, tá uppstillingin fer fram, rætt til at stilla upp ein mann. Maður er uppstillaður sum felagsformansevni, um 5 sóknir/-skipsmanningar skjóta hann upp.*

*Valini eru loynilig og fara fram eftir reglum, sum felagsstjórnin ásetur. Skipast skal so fyri, at limir, sum eru burtur, meðan valið fer fram, skulu hava høvi til at greiða atkvøðu.*

*Atkvøðuseðlarnir verða sendir grannskoðara felagsins, sum telur atkvøðurnar upp.*

*Allir formenn verða valdir fyri trý ár í senn, og tekur valskeiðið við 1. februar.*

Felagsstjórnin hevur annars ásett hesar reglur fyri val:

a. Valrætt hava teir fiskimenn, sum hava goldið limagjald fyri 2005/2006, ella sum í 2006 erumynstraðir og verða avroknaðir eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, tó skiparin undantikin.

b. Felagsskrivstovan sendir áðrenn valið sóknarformonnunum yvirlit yvir fiskimenn við atkvøðurætti.

c. Á atkvøðuseðlinum verða prentað nøvnini á valevnum. Hesin skal koyrast í ein brævbjálva. Aftanfyri skal skrivast navn, bústaður, føðingardagur og seinasta skip og tíðarskeið, viðkomandi hevur verið við. Brævbjálvin skal sendast beinleiðis til grannskoðara felagsins.

d. Sóknarformenninir skipa fyri valinum, soleiðis at teir býta atkvøðuseðlarnar út til limirnar og so vítt gjørligt heinta teir. Í sóknum, har tað av praktiskum ella øðrum orsøkum ikki ber til at nýta hesa mannagongd, verða atkvøðuseðlarnir sendir beinleiðis til limirnar við postinum. Hesir senda teir beinleiðis aftur til grannskoðara felagsins.

e. Har sóknarformenninir skipa fyri valinum, verður samsýningin kr. 7 pr. fiskimann við atkvøðurætti.

f. Atkvøðuseðlarnir skulu vera grannskoðara felagsins í hendi í seinasta lagi 30. januar.

g. Fiskimenn, sum eru burtur, meðan valið fer fram, fáa atkvøðuseðil sendandi umborð.

h. Mannagongdin við valinum verður lýst í bløðunum.

# Hoyvíkssáttmálin hjálpir ikki skerpikjøtinum

Nógv hevur verið tosað um Hoyvíkssáttmálan, og hvussu avmarkaðan fyrimun, hann er fyri Føroyum, í hvussu er í fyrsta umfari.

Vit hava nevnt eitt lítið dømi, sum hesin sáttmáli skuldi loyst. Nevniliga tað skerpikjøt, sum føroyingar í Íslandi royna at taka við sær, tá teir eru í Føroyum at ferðast, so teir kunnu fáa ein bita heima. Hesir verða jakstraðir sum brotsmenn av íslendskum tollarum, sum náðileysir beina fyri tí minsta bógvinum.

Tað er eingin sum ivast í, at hetta ein rein beinleiðis handilsforðing, og undanførslan um at verja móti sjúkum er bert eitt páskot.

Men sum vit frætta úr Íslandi er einki broytt her. Skerpikjøt verður framvegis tikið í tollinum, og ein kann fáa bót! Men onkur sigur at sökjast kann um loyvi í serstökum förum til serligt endamál við serligum treytum. So her er lítið vunnið.

Annars ætlar føroyska sjóheimsheimið í Reykjavík Ørkin at skipa fyri eini ráðstevnu um Hoyvíkssáttmálan. Hon er ætlað at vera í februar, og skal viðgera fyrimunir og vansar við sáttmálanum. Hetta er uttan iva eitt gott hugskot, at ein slík føroysk ráðstevna verður hildin heima hjá "mótpartinum". Helst frætta vit nærri um hetta.

Tíðindaskriv

# Nýggj bók vísir fiskimenn til arbeiðis

Ein nýggj myndabók eftir Mariu Olsen fotograf kemur í hesum døgum út í Føroyum, Stóra Bretlandi og aðrastaðni. Bókin, ið ber heiti "Images of Fishermen", inniheldur seks stórar myndafrásagnir frá fiskitúrum við føroyskum, hetlendskum, íslendskum og grønlendskum skipum.

Hetta er fyrstu ferð at nøkur myndabók so gjølla og umfatandi lýsir sjólív og fiskiskap í Norður Atlantshavi. Talan er um ymiskar veiðihættir og ymisk fiskasløg, og endamálið er ikki minst at lýsa fiskimenn og teirra arbeiðsumhvørvi, sigur Maria Olsen.

Búi Tyril hevur skrivað tekstir til myndafrásagnirnar. Bókin, sum er skrivað á enskum máli, inniheldur harafturat eina frágreiðing eftir heimskenda fiskivinnu serfrøðingin Menakhem Ben-Yami um fiskivinnumál, við serligum atliti til ta føroysku fiskidagaskipanina.

Meira stendur at lesa um bókina á www.images-fishermen.com. Images of Fishermen er innbundin, fyllir 388 síður og inniheldur meira enn 200 litmyndir. Bókin fæst í bókabúðum kring landið og kostar 545 krónur. Forlagið GlobalOne Press í Aberdeen gevur út, meðan tess føroyska umboð PRnewsMedia.com hevur staðið fyri grafiskari uppseting.

Klaksvíkar Sjúkrahús

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Anæstesideildina

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi til anæstesideildina frá 01.01.07.

Førleikakrøv
Góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur.
Prógv sum anæstesisjúkrarøktarfrøðingur.
Góð samstarvsevnir.

Setunartreytir
Løn- og setanartreytir samb. sáttmála millum Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Annfríð Winther, tlf. 454545 lokal 403, ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisation og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Klaksvíkar Sjúkrahús,
Umsjónarmaðurin,
FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 11.12.2006.

## Páll kortini ikki uppsagdur:

# Men var alt hetta neyðugt?

Vit hava í undanfarnum bløðum lýst málið um ætlaðu uppsøgnina av Páll I. Joensen, lærara á Vinnuháskúlanum - aftaná at hava røkt hetta starv samvitskufult í 25 ár.

Málið er nú endað við, at ætlaða uppsøgnin er tikin aftur. Hetta er hent eftir eina rúgvu av vánaligari umrøðu av skúlanum, einum hørðum sálarligum trýsti í longri tíð á Páll og hansara nærmastu, eftir stórt átak frá felagnum hjá Maskinskúlalærarum, sum veruliga hevur gjørt eitt megnar arbeiði í hesum máli.

Vit onnur standa spyrjandi: Var tað veruliga neyðugt, at so nógv postalín mátti knúsast fyri síðani at enda aftur í somu støðu.

Vit endurprenta niðurstøðuna hjá umboðsmanninum, har hann átalar ein hóp av viðurskiftum - bæði á vinnuháskúlanum og í mentamálaráðnum.

Átalurnar snúgva seg um viðurskifti, sum eru so innlýsandi skeiv, og sum kundu verið sloppin undan, um eitt vet av skili hevði verið nýtt. Tað er nóg ringt at hugsa, at slíkt hendir á skúlanum, men at hugsa sær, at tað hjá Mentamálaráðnum - við síni "skipan" - skal bera til at forbróta seg so dyggiliga á so grundleggjandi økjum, tað er óskiljandi. Hetta er heldur ikki fyrstu ferð - hvørki hjá hesum ráðnum ella hjá øðrum aðalráðum, at umboðsmaðurin átalar viðferð av starvsfólki.

Ein hópur av átalum verða givnar, og ein hevur varhugan av, at tað hendir einki meira. Víst verður sagt, at átalurnar "verða tiknar til eftirtektar", men eingin tekur stig til at siga, at nú mugu vit fáa eina skipan, sum tryggjar borgaranum eina virðiliga viðferð frá tí almennu skipanini, so vit sleppa undan slíkum hendingum aftur.

Vit hava ferð eftir ferð víst á onnur dømi um, at borgarin í Føroyum er rættarleysur mótvegis tí almenna, hóast øll føgur orð eru um tað mótsetta. Men eingin er, sum rættur ein fingur at greiða teir grundleggjandi trupulleikarnar. Øllum hesum rokinum høvdu partarnir í málinum sloppið undan, um grundleggjandi rættarreglur høvdu verið hildnar í hesum máli.

Tí kunnu vit heilt vist rokna við, at henda søgan kann endurtaka seg nær sum helst og hvar sum helst í almennu skipanini. Tann, sum tá ikki orkar at stríðast, fer at bukka undir.

Hetta er tann syrgiliga niðurstøðan av hesi gleðisøgu.

Hetta er bert ein samandráttur av eini frágreiðing sum telur 37 síður, sum greiðir nærri frá teimum ymisku mannagongdinum í málinum. Frágreiðingin er skakandi lesnaður um, hvørja viðferð ein heiðursborgari fær í almennu skipanini. Nú bíða vit bert eftir næsta málinum.



*Páll, sum eftir óneyðugar brotasjógvar kortini sleppur undan uppsøgn.*



*Helgi Hansen, er næstformaður í Maskinskúlalærarafelagnum, men sum hevur verið virkandi formaður stóran part av tíðini hetta mál hevur gingið.*



*Niels Johannesen er formaður í felagnum hjá Maskinskúlalærarum.*

# Viðmerking til Dan R. Petersen

Tað er gott, at Dan R. Petersen hevur verið við til at bera landsins byrðar nú í eitt 3 ára skeið.

Til síðsta løgtingsval fekk eg 21 atkvøður, men Dan sigur seg hava fingið 327. Tað eru fleiri orsøkir til tað. Eitt er tað, at Dan var kendur sum løgtingsmaður, meðan eg var eitt óskrivað blað, ein vanligur fiskimaður. Annað er, at Dan førdi eitt rættiliga hart valstríð við nógvari skriving o.s.fr., meðan eg ikki hevði umstøður til tað. Triðja er, at Dan og eg høvdu hvør sína dagsskrá, sum viku rættiliga langt frá hvørji aðrari. Dan førdi onki fram í valstríðnum, sum var til frama fyri fiskimannin. Eg skrivaði 3 stuttar greinar, har ein av greinunum var eitt aftursvar. Hinar báðar vóru um okkara veikastu borgarar og, ja sjálvandi, um korini hjá fiskimonnum. Eg var eisini í ÚF og segði mína hjartans meining um kor fiskimanna, tí tað liggur mær tungt á herðunum. Eg meti, at ein atkvøða til Dan er at fara frá ringum til verri.

Havi altíð havt hjarta fyri fiskimonnum, eg kann ikki annað. Tí var eg rættiliga firtin til síðsta løgtingsval um tann ágang, sum var førdur móti okkum.

Endurgevi eina stutta grein:

"Eg hoyrdi í einari útvarpsframløgu, at tjóðveldisflokkurin lýsti seg sum fiskimanna- og verkaflokk burturav. Tað mundu vera fleiri við mær, ið blivu illa við av at hoyra slíka propaganda. Eg havi veri fiskimaður í 20 ár, og ta tíðina hava vit fiskimenn verið illa viðfarnir av teimum, ið hava tilknýti til handa flokkin. Tey nógvu árini hava tey rópt upp um fiskimenn, ið hava tað so gott. Tey hava neyvan verið við til at sæð sundursorðaðar fiskimenn, ið hava tænt føðilandinum.

Anita á Fríriksmørk hevur í løgtinginum lagt eftir sjómansfrádráttinum og harvið ti hart arbeiðandi fiskimanninum. Eisini hevur formaðurin í Búskaparráðnum lagt eftir fiskimanninum. Tað er ikki so, sum tit siga. Eg vil heita á tykkum um at lata hampafólk fáa frið og ikki sáa slíka gift út. Fiskimaðurin er tann føroyski stoltleikin og er við til gjalda teir nógvu barsilpengarnar, ið millum annað Anita á Fríriksmørk hevur fingið. Man orðatakið "løn skálkinum gott, hann lønir tær aftur við háð og spott," ikki rigga her? Tað var Tjóðveldisflokkurin, ið pressaði tað ígjøgnum, at arbeiðsfólk, fiskimenn, handverkaðarar og onnur á privata arbeiðismarknaðinum ikki fingu sjúkrapengar úr landskassanum frá fyrsta degi."

Soleiðis eigur tað at ljóða frá einum fiskimannahjarta, altíð klárur at verja borg og ikki bara tí, at ein vil sleppa til róðrið í FF.

Nú Dan reypar um 7 skip og 2 sóknarformenn, kann eg siga, at eg havi 10 skip og 3 sóknarformenn, ið hava stillað meg upp. Eg kundi lættliga fingið fleiri at skotið meg upp, men einum nýtist bara 5 stillarar.

Fiskimenn vita, at nú er tað álvara, og tí fara teir ikki at velja ein breyðpolittikara, og teir ivast ikki í, hvør hevur hjarta fyri teimum.

PS. Dan eg hoyri, at tú nýtir tann gamla sjómannamátan, at enda ein samtalu millum skip. Tú og Óli hóska væl saman sum søgufrøðingar. Vónandi geva tit okkurt ritverk út nakað skjótt. Eg eri enn fiskimaður, og tað meti eg sum ein stóran heiður.

Sera blíðar heilsanir frá einum fyrrverandi næmingi til sín fyrrverandi lærara.

*Jan Højgaard*

## Niðurstøðan hjá umboðsmanninum

Álit viðv. noktan av loyvi at sleppa at arbeiða niðursetta tíð vegna sjúku og viðgerð av umsókn um skjalainnlit

Umboðsmaðurin hevur vigjørt eitt mál um noktan av loyvi fyribils at arbeiða niðursetta tíð á Vinnuháskúlanum vegna sjúku. Avgerðin varð kærd til Mentamálaráðið, sum staðfesti avgerðina. Umboðsmaðurin helt seg ikki kunna meta um, hvørt tað var gjørligt hjá skúlanum at kunna játta umsóknini, men ivaðist í, hvørt grundgevingarnar fyri noktanini vóru rættar. Umboðsmaðurin helt ikki, at uppgerðin hjá skúlanum av, hvat sjúkrafráveran hjá klaganum hevði kostað skúlanum var eitt sakligt atlit, eins og umboðsmaðurin helt hóttanina frá stjóranum um uppsøgn, um Mentamálaráðið gav kæranum viðhald, vera heilt burturvið. Umboðsmaðurin helt heldur ikki rættleiðingina, sum Mentamálaráðið segði seg hava givið stjóranum, vera nøktandi, hvørki fyri klagaran ella stjóran, og mælti tí ráðnum til at avgreiða hetta á rættan hátt. Umboðsmaðurin helt eisini avgerðina hjá skúlastjóranum, um at nokta læraranum at hava nakran við sær á fund teirra millum, at vera í stríð við grundleggjandi regluna í § 8 í fyrisitingarlógini. Umboðsmaðurin helt málið bera týðilig brá av, at talan ikki hevði verið um sakliga fyrisiting frá skúlastjóranum, og mælti tí ráðnum til at taka kærumálið uppaftur fyri at kanna, um grundgevingarnar fyri noktandi svarinum eisini vóru tær, sum avgerðin veruliga bygdi á. Umboðsmaðurin hevur kunnað formansskapin í Løgtinginum, løgmann og avvarðandi landsstýrismann um hetta málið. Umboðsmaðurin gav eisini Mentamálaráðnum eina átalu fyri avgreiðsluna av einari innlitsumbøn frá klagaranum.

# Hampiligt ár hjá fiskimonnum



Føroya Fiskimannafelag er í teirri hepnu støðu, at vit til eina og hvørja tíð kunnu gera upp gongdina í veiðumongd og inntøku hjá fiskimonnum.

Tað var longu fyri 30 árum síðani, at FF metti, at skuldi tað vera møguligt at arbeiða til fulnar fyri fiskimenn, so var neyðugt við undirbygdum tilfari um teirra inntøkur.

Vit eru í teirri hepnu støðu, at sambært sáttmálan skulu allar avrokningar hjá fiskimonnum sendast okkum.

Tá vit í 1975 byrjaðu okkara hagtalsvirksemi, skuldi alt arbeiði hesum viðvíkjandi gerast “við hond” og kúlupenni, og var tað tí sera arbeiðskrevjandi. Men vit fingu tað kortini at rigga, og er hetta ein skipan, sum hevur verið ótrúliga hent í øllum teimum ymisku støðum, har vit hava havt brúkt fyri sakligum grundgevingum í okkara arbeiði, sum til dømis við sáttmálasamráðingum, prísáseting o.ø.

Aftaná, at vit fingu teldur, er skipanin blivin enn betri. Hvør avrokning verður tastað inn við øllum upplýsingum, og tí kunnu vit til eina og hvørja tíð gera útskrivtir av, hvussu gongdin hevur verið í einum og hvørjum tíðarskeiði. Tað vanliga er tó, at hugt verður eftir gongdini í álmanakkaárinum.

Hervið eru vit eitt ár frammanfyri teimum almennu hagtølunum, og hetta ger ein stóran mun, tá tað sum oftast er brúk fyri teimum allarnýggjastu upplýsingunum.

Okkara tøl eru eisini eftirspurd av áhugaðum uttanfyri felagið, sum hava brúk fyri teimum til ymisk endamál. Hetta kunnu vera almennir stovnar, grannskoðarar og aðrir. Ikki minst hava fiskimenn áhuga fyri tølunum, eisini tá teir ynskja at sammeta gongdina hjá sínum skipi við onnur líknandi skip.

Vit hava hugt eftir gongdini hjá fiskimonnum higartil í ár og sigast kann, at sum heild sær tað ikki so galið út, hóast tað er sera ymiskt fyri teir ymisku skipabólkarnar.

Tá vit gera hagtøl fyri inntøkur, er tað fiskiparturin, sum er grundarlagið fyri sammetingina. Samlaður partur og dagatal verða tikin við og síðani rokna vit inntøkuna pr. dag. Hetta ger tað lættast at sammeta við onnur skip, aðrar bólkar og við lønarlagið á landi.

Sammetingin verður fyrst og fremst gjørd við eina 8 tímars dagløn hjá arbeiðara, sum við frítíðarløn - men uttan onnur gjøld - er kr. 903 um dagin.

Tey tøl, vit nevna, eru inntøkur grundaðar á tær avrokningar, vit hava fingið. Hjá t.d. ísfiskaskipum koma seinastu túrarnir hjá nógvum teirra inn í november mánað. Her eru daginntøkurnar nakað nær teimum endaligu. Hjá t.d. verksmiðjuskipum, sum gera longri túrar, er tað eitt sindur tilvildarlig, hvussu langt skeið er inni í skipanini. Her kunnu endaligu tølini fyri árið gerast nakað øðrvísi.

Inntøkurnar higartil í 2006 verða so sammettar við endaligu tølini fyri 2005, og síggja vit í hvussu er eina gongd her.

Um vit taka tær einstøku veiðurnar, er úrslitið hetta:

**Lemmatrolarar:**
Talan er um eina lækking í miðalinntøkunum frá kr. 1.823 til kr. 1.740 um dagin. Lækkingin er 5%.

**Partrolarar:**
Her er hinvegin talan um eina hækking frá kr. 1.618 til kr. 1.874 um dagin ella 16%. Veiðan hevur framvegis verið góð, og tað sama hevur verið við prísunum. Gullaksatúrarnir hjá partrolarum eru ikki við í hesum tølum, men teir vildu hækkað miðaltalið í 2006.

**Ísfiskalínuskip:**
Her er eisini talan um eina hækking í daginntøkunum frá kr. 1.290 til kr. 1.474 ella 14%. Tað hevur gingið niðurá hjá línuskipum í fleiri ár, men nú tykist at venda eitt sindur.

**Nótaskip:**
Tað hevur gingið stak væl í ár. Daginntøkan er farin úr kr. 3.222 upp í kr. 4.573.

**Rækjuskip:**
Vit hava bert trý rækjuskip eftir. Hesi hava tískil fingið frægari møguleikar, og tykist hetta at síggjast aftur í inntøkutølunum, har daglønin er farin úr kr. 1.271 í fjør upp í kr. 1.568 í ár. Við øllum fyrivarni fyri restina av árinum er prosenthækkingin 23.

**Garnaskip:**
Tað kann sigast, at støðan er stórt sæð tann sama við kr. 1.554 í dagløn í fjør og kr. 1.531 í ár. Lækkingin er 1,5%.

**Flakatrolarar:**
Hesir tykjast at hava gjørt tað gott í ár við eini miðaldagløn í 2005 uppá kr. 2.015, meðan tølini í ár vísa kr. 2.669.

Eitt annað skip kann verða nevnt, og er tað “Atlantic Navigator”. Hjá teimum var 1. hálvár uppá seg brúkiligt, meðan 2. hálvár hevur púra svikið til fiskiskap, og broytir hetta heilt støðuna.

At inntøkur hjá fiskimonnum eru ymiskar og skiftandi er ein partur av skipanini. Men nakað verður javnað við inntøkutrygdini, sum hóast alt tryggjar fiskimonnum eina dagløn hjá arbeiðara á landi fyri hvønn dag á túrinum.


**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945

FFbladid
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Góður lesnaður - góður prísur
Gerst haldari av FF-blaðnum fyri bert kr. 250,- um árið

Vitja eisini heimasíðuna: www.fiskimannafelag.fo

**MAN B&W Diesel A/S**

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

ALT TIL
ÚTRÓÐRARMANNIN

**GUMMIBÁTATÆNASTAN hevur tað, tú hevur brúk fyri**

Vit hava gummibátin, termodraktina, bjargingarvestin, handskarnar og meginpartin av tí, tú hevur brúk fyri.




**GUMMIBÁTATÆNASTAN**
31 49 13 | Mannaskarð 4 | FO-110 Tórshavn | gbt@gbt.fo | www.gbt.fo

Dagbókin hjá Mikkjal Gulklett – 1. partur:

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 eru samanhangandi og kunnu takast úr blaðnum**

# Á stórhvalaveiðu í Suðuríshavinum

Føroyingar hava altíð havt hug at royna fjarar leiðir. Hetta sæst m.a. á okkara royndum við stórhvalaveiðu í Suðuríshavinum. Í bók síni um Lopra og hvalastøðirnar har, greiðir Erling Poulsen - sum júst er farin - frá føroyskum royndum við hvalaveiðu á hesum leiðum fyrst í hini øldini.

Í summar høvdu vit eisini eina frásøgn um Thomas Jacobsen, ættaður av Skipanesi. Hann fór í 1913 til Suður Georgia at arbeiða á eini hvalastøð, og har hitti hann m.a. kenda pólgranskaran Sir Ernest Shackleton har hann arbeiddi umborð á skipi hansara "Endurance".

Tann 2. september í ár skipaði Miðvágs fornminnissavn fyri eini samkomu í sambandi við, at tað eru meira enn 60 ár liðin, síðani fleiri enn 62 føroyingar fóru á hvalaveiðu við hollendska hvalakókaranum "Willem Barendsz". Á samkomuni varð lisið úr dagbókum, og menn, sum høvdu verið við, greiddu frá. Á samkomuni var stórur áhugi sýndur hesum parti av okkara siglingarsøgu.

Flest allir av hesum monnunum arbeiddu umborð á "hvalakókaranum", meðan nakrir vóru umborð á teimum hvalabátunum, sum veiddu hvalin.

Tað er so heppið, at í hvussu er tveir mans hava skrivað dagbók frá hesum túrinum. Teir eru Mikkjal Gulklett í Nólsoy og Herlon Jacobsen (í Kálvalíð) í Miðvági. Vit hava fingið hendur á dagbókina hjá Mikkjali, og verður hon endurgivin í hesum og teimum báðum komandi bløðunum. Eisini ein partur av tí, sum Herlon skrivar er skoytt upp í dagbókina hjá Mikkjal, og hesi ískoyti eru tí skrivað við skráskrift.

Harafturat er tað so heppið, at Mikkjal hevði keypt sær eitt fototól og hevði tað við á túrinum.



*Mikkjal saman við síni familju í 1980. Aftara rað f.v. Per, Mikkjal, Hildibjørt, Eyðálvur. Frammanfyri: Marita, Katrin, Valborg og Mikala.*



NETHERLANDS WHALING COMPANY LIMITED
AMSTERDAM

CONTRACT-SEASON 1946/47

NETHERLANDS WHALING COMPANY LIMITED, AMSTERDAM.

*Hetta er sáttmálin hjá Mikkjal. Her sæst, at hann er settur sum arbeiðarí á kókarínum, og at lønin er kr. 285 pr. mánaða. Afturat hesum er eitt bonus, sum er 1,86 norsk oyru p. tunnu av lýsi. Framleiðslan á ferðini var 80.000 føt, og hevur bonussið verið um kr. 1.500 fyri túrin.*

Hann tók ein hóp av myndum, og nógvar av teimum eru heilt góðar.

Fyrsti túrurin hjá Mikkjali, f. 9.9 1915, til skips var, tá hann sum bert 15 ára gamal fór við "Gracie" í 1930. Skipari var Jacob Nielsen - í Liða, ættaður úr Nólsoy og systkinabarn Mikkjals.

Onnur skip, hann sigldi við vóru: "Grundick" 1937-38 og 1954, "Emmanuel" 1939, "Silver Belle" 1940, "Lissie" 1945-46 og 1949, "Norðsteinur" 1947, Fossur 1948, "Elsa" , "Falkur" 1952, "Hertha" 1955, "Gustav Darendorf" og "Vón". Mikkjal fór í land í 1960.

Í 1943 leigaðu Mikkjal og aðrir nólsoyingar Miðstovuna Niðri á Bakka í Tórshavn frá D. E. Mohr, meðan teir arbeiddu hjá eingilskmonnum (hersetingarvaldinum). Húsaleigan var 100 kr. um mánaðin ella 5 kr. fyri hvønn av teimum 20 nólsoyingunum.

Mikkjal giftist tann 19. 06.1951 við Hildibjørt Jacobinu Katrin Debes úr Kollafirði, fødd 11.04. 1927.

Tey fingu børnini:
Eyðálvur 04.09.1951
Per 21.09.1952
Maritu 25.09.1956
Katrin 19.06.1958
Valborg 23.07.1060
Mikalu 24.01.1965.

Hildibjørt og Mikkjal fluttu út aftur til Nólsoyar við tveimum teimum yngstu børnunum, tá flakavirkið var sett á stovn í 1976. Har arbeiddi Mikkjal til 1986, tá hann var raktur av fleiri blóðtøppum og gjørdist avlamin.

Hann var heima hjá konuni í nøkur ár; men versnaði so við og við, til hann at enda var fluttur á Landssjúkrahúsið 5 mánaðir, áðrenn hann fór heim í teir ævigu bústaðir tann 11.10.1990.



*Martin Tórgarð var ein av føroysku manningini, og hann er eisini við í frásøgnini. Vit hava fingið fleiri myndir frá honum, og hann hevur hjálpt okkum at seta nøvn á myndirnar í greinarøðini.*

Vit hava eisini lænt myndir frá Martini Tórgarð, sum eisini var við henda túrin. Tískil kunnu vit prýða frásøgnina við nógvum frálíkum myndum. Martin hevur hjálpt okkum at seta tekst til myndirnar og at navngeva føroyingarnar, sum eru á teimum.

Samanlagt hava vit fingið eina frálíka frásøgn um hendan túrin og eitt óført ískoyti til okkara siglingarsøgu.

Vit eru sera fegin um at kunna læna hetta tilfarið, og tað sæst, at Mikkjal er ein mentaður maður, og hann skrivar heilt reint føroyskt mál. Hann hevði nevniliga góðan lærara í føroyskum. Hesin var Símun Simonsen, ættaður av Brúnni í Norðragøtu.

Kona Mikkjal, Hildibjørt, greiðir frá, at tann dagin, hann og hinir nólsoyingarnir fóru avstað, var hon á veg til neytar. Tá hoyrdi hon Martin Tórgarð sita og spæla harmoniku, meðan teir stevndu út frá gomlu brúnni í Nólsoy. Hann sang:

*"Smil imens jeg*
*kysser dig farvel,*
*Hvert af dine kys*
*mig bringer held,*
*Bed for mig, min egen*
*dertil vi ses igen".*

Dagbókin

*Mánadagur 1. oktober 1946. Fóru frá Tórshavn við "Barjamu" kl 2 ½. Komu til Scrabster.*

2. oktober

*Allir fóru í land og búðu á flottum hotelli.*

3. oktober

*Fóru frá Scrabster kl. 9 við toki. Komu til Inverness og fingu døgverða*

*Framhald á næstu síðu*

*og so aftur í tok til London. Komu til London kl 10.00, fóru inn á eitt hotel. Tað regnaði.*

4. oktober
*Fóru frá London við toki til Harwich. Komu til Harwich um kvøldið, so umborð á fergun, sum fór til Hook van Holland. Og so við toki til Amsterdam.*

5. oktober
*Vit búgva á einum sjómansheimi. Í dag vóru vit í djóragarðinum.*

6. oktober
*...einki serligt í dag...*

7. oktober
*...einki serligt í dag...*

8. oktober
*...einki serligt í dag...*

9. oktober
*...einki serligt í dag...*

10. oktober
vóru 36 menn á kontórinum og ordnaðu passið og sjófartsbókina umframt finguravtrykk varð sett í passið og í eina serliga journal fyri reiðaríið.

Tá teir vóru lidnir við tað, vóru teir, sum skuldu við hvalabátunum, tiknir burtur úr og sendir til doktara fyri at taka eygu- og hoyriprøva. Nakrir norðmenn, sum búgva her saman við okkum, vóru eisini hjá doktara og á kontórinum.

11. oktober
fingu vit útbetalt pening fyri reisiútgiftir, vit høvdu goldið av okkara egna lumma. Merkiligt nokk vísti tað seg, at bygdarmenninir, sum komu langvegis frá, høvdu minni útgiftir enn havnarmenn.

Útgiftirnar hjá bygdarmonnum lógu frá 20 upp til 60 kr. Hjá havnarmonnum frá 80 upp til 150 kr. Klagað varð um, at vit fingu lítið og einki av kjøti. Tó tað var lovað okkum, at vit skuldu fáa nokk av tí. Tá kom fyri dagin, at hovmeistarin hevði selt ein stóran part av kjøtinum á svartabørs.

12. oktober
fingu vit bíløtini frá fotografinum, sum vit allir vóru uppi á. Hann bjóðaði sær at senda tey heim til Føroya til Louis Apol, sum so skuldi senda tey til sítt rætta pláss í Føroyum. Tey kostaðu 60 cent pr. stk. Eg keypti mær eitt fotografiapparat og tveir filmar frá Richard Nybo fyri ca. 55 danskar krónur.

13. oktober
Sunnudagin 13. oktober vóru vit í friði á sjómansheiminum. Tá fingu vit



*"Willem Barendsz" var bygdur sum oljutangaskip í Gøteborg í Svøríki í 1931. Støddin var 10.409 t. Longdin var 155 m, breiddin 20 m. og dýpdin 9,5m. Maskinorkan var 2 x2400 hk B&W. Skipið varð í 1945 keypt til Hollands og bygt um til hvalaskip. Sum tað sæst var forvitinskapurin stórur. Nógv fólk á bryggjuni.*



*Hetta var ein av hvalabátunum, sum var við á ferðini.*



*Ein stórhending á ferðini var tann sokallaði linjudópurin, tá farið varð um ekvator. Her gongur tað lívliga fyri seg!*



*Tað vóru fleiri nólsoyingar við. Her síggja vit Mikkjal t.v., ein hollendskan fotograf og Tórálv Poulsen.*

boð um, at vit allir skuldi møta upp umborð á "Willem Barendsz" kl. 7 morgunin eftir.

14. oktober
kl. 6 um morgunin vórðu vit vaktir. Kl. 6.30 fingu vit morgunmat. kl. 7 fóru vit við fergu yvir til dokkina, har kókaríið lá. Vit loystu skipið, og so varð tað sleipað út til eina boyu fyri at rætta kumpass. Tað vardi 3 tímar. Síðani var tað sleipað upp á síðuna á einum tangabáti at taka olju.

Nakrir mans mynstraðu umborð á "Willem Barendsz" sama dag. Vit skrivaðu okkara navn upp á bemandingslistan og fingu so eitt nummar - hvør maður - fyri at tað skuldi vera lættari at finna skil á øllum. Eg fekk nummar 145. Vit máttu eisini undirskriva "tavshedspligt" um alt sum gekk fyri seg umborð. Vit vóru umborð til kl. 3 um dagin, tá fóru vit í land aftur. Tá høvdu vit verið umborð í 9 tímar og hvørki fingið mat ella drekka, so fyrsti dagur umborð var einki serliga hugnaligur.

15. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu mjølsekkir og mjøltunnur og stúvaðu tað av.

Tað var ógvuliga lættligt at fáast við. Vit fóru í fergu bæði til og frá skipinum.

*Vit sóu nakrar damur, sum vóru útstillaðar í einum vindeyga, tær vóru horur.*

16. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu ymiskar vørur og útgerð. Meðan eg arbeiddi í lastini, var ein vestur stolin frá mær.

17. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu mjøl og aðra útgerð. Tá vit komu heim aftur á hotellið og høvdu etið náttúrða, settu vit okkum inn í stovuna at spæla kort. Meðan vit sótu har, kom Richard Nybo og fortaldi, at ein tjóvur hevði brotið inn í kamar hansara og stolið ein jakka og tvinnar buksur umframt undirklæðir. Í jakkanum hevði hann pass, kontrakt og onnur pappír. Hann klagaði sína neyð fyri tí hægsta í hotellinum, men hann segði, at tað kom ikki sær við. Vit máttu sjálvir passa okkara klæðir. Richard fór so á politistøðina og fekk ein mann hagani at koma og hyggja at kamarinum. Hann slerdi upp á sjómansheiminum, at tann sum hevði tikið klæðini skuldi bera tey aftur frívilliga.

18. oktober
vóru vit umborð og arbeiddu ymiskt arbeiði. Seinnapartin var skipið sleipað inn aftur til dokkina fyri at gerast liðugt.

19. oktober
fóru nakrir av okkum ikki til arbeiðis. Vit fóru á kontórið at fáa pengar. Tá vóru pengarnir sendir umborð á skipið. Vit fóru so umborð, men vit fingu ikki so nógv, sum vit vildu hava. Tað var lovað okkum, at vit skuldu fáa teir seinni. Tá vit fóru at eta nátturða, kom hovmeistarin og gav Richard Nybo hansara teknibók við passi og øllum pappínum í. Hann segði, at hon var komin í postkassan ½ tíma eftir at klæðini vóru stolin. Sama kvøld, sum klæðini vóru stolin, var ein blá troyggja stolin frá xx. Frá einum norðmanni vóru stolnar 50 danskar krónur.

20. oktober
Sunnudagin 20. oktober vóru vit í friði á sjómansheiminum. Sama dag vitjaðu 4000 menniskjur umborð á "Willem Barendsz" fyri at síggja skipið.

21. oktober
vóru vit umborð og arbeiddu ymiskt. Tann dagin var ein troyggja stolin frá einum havnarmanni.

22. oktober
vóru vit umborð á "Willem Barendsz" og lossaðu ymiskar vørur umborð harímillum medisin og aðrar apotekaravørur. Tvær flúgvimaskinur skulu vera við skipinum fyri at leita eftir skotnum hvalum og eisini at finna livandi hvalir. Onnur var tikin inn á afturdekkið seinnapartin. Dagin fyri var ein "journalistur" frá einum dagblaði umborð og fotograferaði skipið. Hann fotograferaði allar føroyingarnar upp á 2 bíløt saman við øðrum av manningini.

Prinsurin kom umborð

23. oktober
vóru vit umborð og lossaðu ymisk sløg av jarni, tunnur og gassfløskur. Ein lítil skjótgangandi bátur - av tí slagnum teir kalla fyri "rasari" - var tikin umborð í morgun. Tað vildi so illa til, at hann brotnaði, so hann má óivað koyrast í landi aftur. Vit skuldu í dag flyta flúgvimaskinina á dekkinum. Hon brotnaði undir halanum. Tað hjólið, hon rullar á, hevði gamalt brák á akslinum, og tað brotnaði. Í dag var prinsurin umborð og hugdi at skipinum.

Tað vóru minst 1.000 menniskjur umborð og hugdu at skipinum, so tað var næstan ikki arbeiðandi fyri fólki. Tey vóru altíð í vegin.

*Tað var grúiligt fólk umborð at síggja skipið. Prins Bernhard kom umborð.*

24. oktober
vóru vit umborð og arbeiddu. Tann dagin var

*Framhald á síðu 15*










# SKIPSASSISTENTUR (DEKKARI) TIL NORRÖNU

Smyril Line søkir eftir skipsassistenti til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til skipsassistent:**
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Vera ágrýtin og røkin
- Góð samstarvsevni

**Arbeiðsuppgávur:**
- Alt vanligt skipsarbeiði
- Høvuðsuppgávan verður málinga- og reingerðisarbeiði á dekkunum v.m.

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 10. desembur 2006.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til financial controller á:

+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 380 - 7. desember 2006

# Í 100 ára degi hjá Andrias í Tarti

Seinasta fríggjadag fylti Andrias í Tarti í Oyndarfirði 100 ár. Tað er óneyðugt hjá okkum at geva eina nærri lýsing av føðingardagsbarninum, sum er sera kendur av okkara lesarum fyri síni framúr lýsing av sínum langa lívi. Vit hava higartil havt fimm partar, og seinni koma tveir ella tríggir partar afturat.

Andrias fekk ein stórslignan føðingardag, har vit sjálvandi vóru við. Her vóru allir teir leiðandi persónar, sum roknast kundi við, m.a. løgmaður, sum er hálvur oyndfirðingur. Tá Andrias er kendur sum ein íðin tjóðveldismaður, var hansara flokkur sum rímiligt er sera væl umboðaður. Tað stuttliga er, at hóast vit báðir hava prátað nógv saman, so hevur Andrias ikki nevnt politikk. Kanska hevur Andrias hugsað, at hetta kortini hevði verið burturspilt.

Tað vóru nógvar talur, og fyri FF-blaðið var tað fløvandi, hvussu nógvir talarar tóku til frásøgnina hjá Andrias, sum varð mett sum eitt virðismikið íkast til okkara fiskimannasøgu. Eisini varð Andrias í talunum lýstur sum tað stóra menniskja hann er.

Vit vilja lýsa dagin við nøkrum myndum og vilja nýta høvið at takka Malfrid og Andrias fyri seinast.



*Her er Andrias saman við síni "ungu" konu, sum "bert" er 85 ár. Aftanfyri systirsonur Andrias, Kartni Ravnsfjall, sonur Linu.*



*Systirdóttirin Freydis Poulsen var eisini við. Hon hevur m.a. skrivað Oyndfjarða søgu, har Andrias eisini eigur sín part. Freydis hevur eisini verið til stóra hjálp í samband við søguna um Andrias.*



*Andrias saman við sínum søguskrivara.*



*91 ára gamla Mia í Ansastovu var eisini millum gestirnar.*



*Lina, systir Andrias, saman við soninum Jógvan Ravnsfjall.*



*Undirhald var eisini. Her var ikki neyðugt at fara útum ættina. Sámal Ravnsfjall er systirsonur.*



*Dóttirin Amy saman við tí yngra ættarliðnum.*



*Hetta er vist tað næsta Andrias kemur tjóðveldinum! Høgni lovaði í síni røðu, at tjóðveldið skuldi koma í hansara tíð. Spurningurin er, um Andrias gerst **SO** gamal!*



*Sonurin Sigtór saman við soni sínum Jógvan Andreas.*



*Systkinabørnini Árni Joensen og Jóannes Eidesgaard. Pápi Jóannes, Erling, var sonur Justines í Oyndarfirði.*



*Av teimum 12 systkjunum í Tarti eru fýra eftir, Andrias, Lina, og so Arni og Napoleon, sum síggjast her.*

# Framúr myndabók um fiskimenn

Í hesum døgum er komin út myndabók, sum er sera sjáldsom á tann hátt, at hon setir fiskimenn og teirra arbeiði í fokus. Vit vísa til tíðindaskrivið um bókina, men vilja tó leggja nøkur orð afturat, hóast tíðin ikki hevur verið til annað enn at kaga gjøgnum bókina.

Sigast má, at hetta er eitt ótrúliga flott verk við framúrskarandi myndum av skipum og fiskimonnum.Tað er sera áhugavert, at henda bókin fevnir um fleiri lond og harvið um fiskimenn úr fleiri londum.

Taka vit føroyskar fiskimenn, so eru hesir umboðaðir í bókini við trimum veiðuhættum. Tann fyrsti er garnaveiða eftir havtasku við "Gudrun", sum veiðir á grunnum vatni.At hesin veiðuháttur kom upp í lag, eigur FF sín lítla part av. Í teirri tíðini, tá ið vit enn sluppu upp í part at geva tilmæli um býtið av almennu játtanini til fiskiroyndir, var tað eftir uppskoti frá okkum givin stuðul til royndir at veiða havtasku á grunnum vatni. Hildið varð, at tað kundi vera áhugavert at finna út av, um havtaskan fór á grunt vatn um summarið.

Hesar royndir fór Kristin Vilhelmsen í holt við. Eftir trupla byrjan varð staðfest, at hetta var júst tað, sum hendi við havtaskuni, tískil eydnaðist hendan royndin sera væl.

Annars eru eisini greinir í bókini um teir ymsu veiðuhættirnar. Í greinini um hendan veiðuhættum greiðir Kristin frá sínum lívi á sjónum, sum hann byrjaði sum rækjumaður. Bókin hevur eisini framúr góðar myndir av havtasku, sum er ein sera hugtakandi fiskur, hóast hann er ljótur.

Tann næsti parturin um føroyska fiskiveiðu er frásøgn um partroling við Betatrolarunum "Baki" og "Stelki". Óivað eru tað ikki øll, sum vita, hvussu partroling fer fram, men hetta fáa tey í hvussu er nakað at vita um í hesi frásøgnini.

Her er eisini ein grein, sum greiðir frá søguni um Kubatrolararnar, og er henda sera áhugaverd.Tað sermerkta og einastandandi er, at allir upplýsingar um veiðuna øll árini hjá hesum trolarum eru skrásettir í einari millión av skjølum. Onkur fer kanska einaferð í tíðini at vera útnevndur doktari við at gera eina ritgerð út frá hesum skjølum.

Tosað verður eisini við manning á skipunum, og sigast kann, at upsi er tað mest óútrokniliga fiskaslagið, sum hevur verið á okkara leiðum, men hetta er ein onnur søga, sum vit annars hava lýst fyrr.

Seinasti føroyski parturin er um partroling eftir sild við "Norðborg" og "Christian í Grótinum".

Í bókini er eisini ein longri søga um hesa veiðu og søguna aftanfyri hana, og er hon ikki minst spennandi hjá reiðarínum hjá hesum báðum skipum, tá hugsað verður um tann nýbygningin, teir nú hava bílagt.

Stigtakanin til hesa bók er frálík, ikki minst sæð frá einum fiskimannasjónarmiði.

Bókin er eitt frálíkt jólagávuhugskot, um onkur reiðari skuldi havt hug at givið síni manning eina jólagávu!


Tað er ikki bara sum at siga tað at fáa havtaskuna úr gørnunum


Partroling


Sildaflakið umborð á Norðborg verður fingið til høldar



# Gunnbjørg lagt frá sær

Fríggjadagin var móttøka á Realinum í samband við, at Gunnbjørg Rubeksen legði frá sær, nú hon er 67 ára gomul. Hon hevur starvast á stovninum í 35 ár. Tað er tó ikki tí, at hon á nakran hátt er merkt av elli, at hon leggur frá sær, men soleiðis eru reglurnar innan tað almenna.

Vit hava kenst øll hesi 35 árini. Orsøkin var fyrst og fremst okkara luttøka í prístalsútrokningini, so leingi henda skipan vardi. Realurin og prísráðið høvdu skrivstovu saman í mong ár. Eisini hevur FF verið umboðað í umboðsráðnum hjá Realinum, og alt hetta hevur ført til nógv samskifti, sum eisini umfataði onnur viðurskifti, sum t.d. okkara felags ætt!

Sum tað varð sagt á móttøkuni hevur Gunnbjørg altíð verið eitt álitisfólk. Í hennara tíð hava verið mong stjóraskifti. Tá er tað sera umráðandi, at tað eru fólk við skili, sum vita, hvat alt snýr seg um. Hetta hevur Gunnbjørg gjørt, og hon hevur eisini sjálv verið virkandi stjóri í stovninum. Her kann verða nevnt, at tá vit høvdu frásøgn frá 50 ára stovningardegnum hjá Realinum í fjør, høvdu vit eisini eina frásøgn frá Kai Lemberg, sum hevði tilknýti til stovnin í mong ár. Her tekur hann til starvsfólkið og serliga "fru Rubeksen", sum "søde og varme mennersker, som det var en glæde at snakke med".

Gunnbjørg er ættað av Skála, og er gift við Hendrik Rubeksen. Tey eiga døturnar Lisu og Honna, og ommubørnini eru 6 í tali.

Vit vóru sjálvsagt eisini við á móttøkuna og vilja takka Gunnbjørg fyri alt okkara samskifti hesi mongu ár.



*Óli Heinesen, formaður fyri Realin, saman við Gunnbjørg.*



*Bárður Nielsen hevur Realin sum ábyrgdarøki. Her saman við Leiv Michelsen, sum er dagligur leiðari á Realinum.*



*Væl av fólki var møtt upp.*



*Gunnbjørg saman við sínum.. f.v. ommubørnini Rógvi, Hans Hjørleivur, lítla Gunnbjørg, aftanfyri: Hanus, dóttirin Lisa, Gunnbjørg, Hendrik og Palma, mostir Gunnbjørg.*



*Ulla Swarrer Wang t.v. er partur av leiðslunu á Realinum. Sólva Dam er einkjan eftir Atla Dam, sum var dagligur leiðari í mong ár.*



*Brøðurnir Egil og Birgir Simonsen hava havt samskifti við Realin í mong ár.*

Framhald av síðu 10

stórt ball umborð av teirri orsøk, at tann dagin var skipið leyst frá bedingini og bleiv yvirtikið av reiðarínum. Ein ministari var umborð tann dagin. Tá hann kom umborð, fór merki felagsins til tops. Tað var ein javnur streymur umborð av fólki at síggja skipið allan dagin. Tað mundu vera fleiri túsund fólk. Tað vóru so nógv, at tað var sjáldan arbeiðandi fyri teimum.

*Vit fóru umborð at búgva. Vit hava 3 læknar umborð og ein prest.*

25. oktober
arbeiddu vit umborð á "Willem Barendsz". Kl. 4 fingu vit boð um at fara í land eftir klæðunum. Kl. 6 fóru vit umborð. Kl. 7½ ótu vit døgurða umborð fyri fyrstu ferð. Tá vit fóru av sjómansheiminum, komu norðmenn aftur í staðin fyri okkum. Teir skuldu eisini við "Willem Barendsz". Tað stendur í hollendskum bløðum, at føroyingar heima eru illir um, at vit fara við til hvalaveiðu við "Willem Barendsz".

26. oktober
arbeiddu vit allan dagin fyri at gera skipið liðugt at fara avstað. Vit byrjaðu kl. 8 um morgunin og endaðu kl. 7 um kvøldið. Í dag kom ein flúgvimaskina umborð aftrat. Tá vit hildu uppat at arbeiða, komu hollendarar umborð at arbeiða. Teir arbeiddu alla náttina. Fleiri politistar ansaðu eftir teimum, meðan teir arbeiddu.

27. oktober
Sunnudagin 27. oktober kl. 9 um morgunin var loyst frá kaiuni og farið avstað. Tveir sleiparar vóru á framendanum og ein á afturendanum. Eitt politiorkestur spældi á kaiuni, tá skipið varð loyst. Brúgvarnar vóru svartar av fólki, har skipið kom framvið. Eitt ótal av bátum fylgdi skipinum avstað. Tað vóru nógv túsund menniskjur á fótum at síggja, at skipið fór avstað. Komnir nakað út um Amsterdam var lagt til eina brúgv í Imuiden, har vit tóku ammunitión inn. Tá vit vóru lidnir við ammuntiónina, fór sirenan at ýla. Tað var boð til fólkið um at koma til bátarnar beinan vegin og hava redningsbeltið hjá sær. Øllum fólkinum á skipinum varð sagt, hvønn bát, teir skuldu koma til, og hvat teir skuldu gera í bátinum. Henda fyrsta royndin við redningsbátunum fall ikki væl út, tí nógv fólk møtti ikki upp við bátarnar. Tað var gott



1. Herlon Jacobsen (Kálvalíð), Miðvágur
2. Karstin Hansen (?)
3. Niels Midjord, Akrar ella Sumba
4. Hans Jákup (?), Miðvágur
5. Aksel Nielsen, Sumba
6. Dánial Johannes Mørk, Miðvágur
7. Mikkjal Danielsen (Gulklett), Nólsoy
8. Thomas Pauli Thomsen, Nólsoy
9. Tórálvur Poulsen, Nólsoy
10. Viljormur Joensen, Nólsoy (páp Ova)
11. Palli Frederiksen hjá Kunoyinginum, Miðv.
12. Henning Jacobsen, Miðvágur
13. Hilmar Petersen, Sandavágur
14. Juul Jacobsen, Nólsoy
15. Bjarki Skaale, Tórshavn
16. Anders Andersen, Strendur
17. Absalon Jensen, Tórshavn
18. Richard Nybo, Hestur
19. Hans Zachariasen, Hestur
20. Roald Hermansen, Hósvík
21. Óli Olsen, Argir
22. Martin Hentze, Sandur
23. Emil Lyngvej, Hestur
24. Niels Pauli Kjærbæk, Sumba
25. Poul (á Borð) Hansen, Tórshavn
26. Ludvig Jacobsen, Miðvágur
27. Óli Christian Jacobsen, Tórshavn
28. Johannes Heinesen, Múli
29. Marius Kamban, Tórshavn
30. Johan við Stein (Pollux), Tórshavn
31. Torbjørn Joensen, Tórshavn
32. Hans Jacob Hansen, Argir
33. Símun Pauli Lilaa, Lorvík
34. Poul Johs. Zachariasen, Sandur
35. Martin Tórgarð, Nólsoy
36. Hans Jacob Berg, Sandur
37. Sigurð Hentze, Skopun
38. Karl Hansen (Reynheim), Tórshavn
39. Aksel Petersen, Norðdepil
40. Juleif Jacobsen, Tórshavn
41. Magnus Sørensen, Dalur
42. Nikkel Jacobsen, Lorvík
43. Vilhelm Wilhelmsen, Tórshavn
44. Ejler Bærentsen, Tórshavn
45. Tórberg Gudmundsson, Tvøroyri
46. Johannes Poulsen (á Kák), Tórshavn
47. Hans Erling Guttesen (Abbi), Tórshavn
48. Napoleon Nolsøe, Vágur
49. Óli Bech, Dalur (sonur nr. 58)
50. Arnold Davidsen, Nes
51. Johs. Olsen, Sandur
52. Christian Mittún (Mattalág), Tórshavn
53. Róland Olsen, Kollafjørður
54. Henry Johansen, Vestmanna
56. Theodor Samuelsen, Tórshavn
57. Lars Davidsen, Vágur
58. Olivur Bech, Dalur
59. Abraham Joensen, Vestmanna
60. Napoleon Olsen, Hósvík
61. Johannes Eirikstoft, Tórshavn
62. Ebbe Mortensen, Tórshavn
63. Åge Hvidfeldt, Tvøroyri



*Her stuttleika teir sær óført. Her síggja vit f.v. 1. Torberg Gudmundsson, 4. Óli Olsen, Argir, nr. 5 Hans J. Poulsen, Miðvágur, nr. 7 Juul Jacobsen, Nólsoy, nr. 8 Richard Nybo, Hestur nr. 9 Emil Lyngvej, Hestur og við bakinum til Polluks, pápi Kára við Stein.*

veður men regnaði illa. Tá vit komu nakað longur út, komu vit inn í eina kanal. Vit máttu bíða ein hálvan tíma, áðrenn tað var pumpað so mikið at sjógvi inn í kanalina, at skipið kundi sigla víðari. Meðan vit lógu í kanalini, var øgiliga nógv av fólki og hugdi at skipinum. Kl. 6 um kvøldið sleptu sleipararnir skipinum, tá vóru vit væl leysir frá landið. Nú byrjaði ferðin hjá "Willem Barendsz".

*Sigldu frá Amsterdam kl 9.00. Tað var regn allan dagin. Vit steðgaðu í kanalini. Ein ógvulig rúgva av fólki og hugdi at og spældi eitt hornorkestur fyri okkum. Øll skip í havnini heilsaðu, tá vit silgdu til Southhampton eftir provianti. Eg fekk einar styvlar, ein frakka og einar skógvar.*

28. oktober
vóru vit vaktir kl. 7 um morgunin. Kl. 8 byrjaðu vit at arbeiða, og var tað arbeitt til kl. 9 um kvøldið. Tá var dekkið so toluliga ruddiligt. Vit sóu nógv skip suður gjøgnum kanalina. Meðan vit sigldu fram við Dover, sóu vit fleiri skipsvrak, sum lógu sokkin á botni við mastrum og kommandobrúgv upp undan.

Sóu "Queen Mary" og "Queen Elisabeth"

29. oktober
kl. 7 um morgunin vóru vit komnir inn til Southampton, har vit skuldu taka ymiska útgerð umborð. Kl. 9 kom loðsurin umborð og førdi skipið inn til eina kai. Skipið var væntað, tí lægtarar lógu klárir og bíðaðu, og arbeiðið byrjaði beinanvegin. Kl. 5 var hildið uppat at arbeiða. Teir menn, sum vildu hava pengar til at fara í land við, fingu 1½ pund.

30. oktober
arbeiddu vit ymiskt arbeiði umborð. Tá vit byrjaðu um morgunin, manglaðu 16 mans. Teir vóru eftir í landi og høvdu ongantíð verið umborð um náttina. Seinnapartin var onnur flúgvimaskinan útsett fyri at leita eftir einum hvalabáti, sum einki var frætt frá. Hon kom tó skjótt aftur og segði alt at vera í besta lagi. Fleiri føroyingar vóru og hugdu at "Queen Mary" sum liggur í eini dokk her í Southampton.

31. oktober
arbeiddu vit umborð. Tað var mest timbur, sum skuldi stúgvast og surrast fast. Um kvøldið var eg saman við fleiri øðrum av manningin og hugdi at "Queen Elisabeth", sum liggur við eina kai tætt við har, sum "Wilhelm Barendsz" liggur.

*…allur býurin er bombaður.*

1. november
var farið frá kaiuni og út á redina. Har var ankrað upp. Sagt var, at skipið skuldi bíða eftir hvalabátunum, sum skuldu koma til Southampton og síðani fylgjast við kókarínum suður eftir. Um kvøldið fingu vit eina bók, har í vit skuldu skriva upp teir tímar, vit arbeiddu yvirtíð.

Eg havi fingið 7 pakkar av cigarettum.

2. november
arbeiddu vit á dekkinum fyri at fáa tað ruddað, áðrenn vit skuldu sigla. Tað var givið uppat at arbeiða kl. 3 um dagin. Tað, sum eftir var at arbeiða, skuldi bíða til morgunin eftir. Um kvøldið fingu vit sápu til salg umborð umframt aðrar vørur.

*...eg fekk 10 sunlight sápur, 5 sápur til andlit, 1 skógvar, 10 pakkar av tyggigummi, 5 pk av cigarettum.*

3. november
Sunnudagin 3. november arbeiddu vit frá kl. 8 um morgunin til kl. 3 seinnapartin. Dekkið var ruddað, og tá tað var liðugt, var farið at sigla. 4 av hvalabátunum skuldu fylgjast við okkum. Um kvøldið vóru nógv telegramm send yvir Amsterdam til Føroyar. Vit fóru at sigla kl. 1.

*Regn allan dagin ...settu kós móti Cape Town í Afrika, eg sendi telegram heim kl 6.00. Vit fingu ein snaps.*

4. november
arbeiddu vit á dekkinum við ymiskt arbeiði. Tríggir hvalabátar sóust tætt hjá okkum. Tann fjórði sást ikki. Tað var stór og tung alda, men lítil vindur. Um kvøldið var kósin forandrað, tá kom aldan at vera meira til síðuna, og

Framhald á næstu síðu

skipið fór at rulla nakað.

*….eg fekk 1000 cigarettir, 8 plátur Cavendis, 5 pk svávulpinnar, 10 pk chokoladur, einar handskar.*

5. november
arbeiddu vit á dekkinum við at smyrja veirar og kveyla teir upp á afturdekkið. Kl. 5 um dagin møttu vit einum dampara, sum kom frá Suðuramerika. Hann hoyrdi til sama reiðarí sum "Willem Barendsz". Navnið á honum var "Ittersom". Kl. 12 í dag vóru vit mitt í Biskayabuktuni. Hin fjórði hvalabáturin kom ongantíð fram, so tað eru bert tríggir, sum fylgjast við kókarínum.

6. november
var arbeitt á dekkinum. Tað var mest spleysan av veirum og trossum sum gjørt var. Veðrið er av tí allarbesta.

*Arbeiddu við at spleysa weir. Hvalabátarnir tóku olju frá okkum. Eg tók eina tonn. Eru árakað Frankaríki. Fekk telegram við portugalsku strondina.*

7. november
var arbeitt á dekkinum allan dagin. Seinnapartin kom ein hvalabátur á borði at fáa sær nakað av provianti umborð. Nakað seinni kom ein annar at fáa sær eina tunnu av solarolju. Veðrið er stak gott. Á middegi vóru vit tvørs av Lissabon í Portugal.

8. november
var ymiskt arbeiði á dekkinum. Ein hvalabátur kom á borði seinnapartin at taka vatn og olju. Á middegi vóru vit tvørs av Spansk Marokko. Í dag var stilli og sól - ikki ov heitt.

9. november
var arbeitt á dekkinum til kl. 1. Tá fingu vit frí, tað sum var eftir av degnum. Ein hvalabátur kom aftur í dag at fáa sær vatn og olju. Skiparin á honum gramdi seg um, at hann og stýrimaðurin máttu gera alt arbeiði umborð, tí manningin var øll frá Hollandi. Teir dugdu bara at tosa hollendskt. Teir forstóðu hvørki norskt ella eingilskt.

10. november
Sunnudagin 10. november - tíðliga á morgni - sóu vit tær Kanarisku oyggjarnar. Teir tríggir hvalabátarnir, sum vóru eftir í Southampton, sigldu hagani frá hósmorgunin. Um kvøldið høvdu vit mist landið úr eygsjón. Um kvøldið var togtogan á dekkinum millum føroyingar og hollendarar. Føroyingarnir vunnu. Eisini var boksikampur millum hollendarar sínámillum. Ljósbíløt eru at síggja hvørt leygarkvøld í messuni.



*Hvør maður á dekkinum.*



*Her eru menn klárir at fara avstað. F.v. Jóhannes Danielsen, Havn, Martin Hentze, Sandur, Bjarki Skaale, Havn, Torbjørn Joensen, sonur Jóan J. skómakaran, Havn og Thomas Pauli Thomsen, Nólsoy.*

11. november
var arbeitt á dekkinum ymiskt arbeiði. Sólin skein og tað var øgiliga heitt. Segl vóru spent tvørtur um dekkið fyri at fáa nakað av lívd móti hitanum. Tá ið vit sigldu millum tær Kanarisku oyggjarnar í gjár, sóu vit ein stóran bý. Hann eitur Santa Cruz og liggur á oynni Tenerife.

12. november
var arbeitt á dekkinum uppá veirar og manilla. Tað var ikki so heitt sum dagin fyri. Tað er so almindiligt, tá ið arbeitt verður, at menninir ganga naknir yvir beltið fyri at tola hitan betur.

13. november
var sama arbeiði fyri á dekkinum. Ein hvalabátur kom í dag at fáa sær olju og vatn. Teir høvdu við sær tveir flúgvifiskar, sum vóru dotnir niður á dekkið hjá teim. Teir sóu út sum ein stór sild. Tað var bert tann munur, at teir høvdu veingir. Í dag frættist, at ein dampari úr sama reiðarí sum "Willem Barendsz", skuldi møta okkum og taka post heim frá okkum. Tað varð ikki so.

14. november
var arbeitt á dekkinum við sama lag. Fleiri av monnunum eru so illa sólbrendir, at teir fáa illa arbeitt. Kl. 7½ helt sekreterurin eitt møti í messuni um kontraktina. Teir tríggir hvalabátarnir, sum vóru eftir í Southampton, komu í dag til Las Palmas á teim Kanarisku oyggjunum.

15. november
varð arbeitt allan dagin á dekkinum við sama arbeiði sum dagarnar fyri. Um kvøldið fór at regna, og tað bleiv nakað væl av vindi. Toran fór at ganga, og alt havið var upplýst sum klárur dagur av toruljósum og veðurljósum. Um einar tveir tímar helt toran uppat, og tað var gott veður aftur.

16. november
var arbeitt til kl. 1 við ymiskt arbeiði. Um kvøldið sóu vit ljósbíløt úti á dekkinum. Meðan vit hugdu eftir ljósbíløtum fór at regna, so mátti tað flytast inn í messuna fyri at síggjast liðugt.

## Neptun kongur kemur umborð

17. november
Sunnudagin 17. november var allarbesta veður. Tað trongdi til, tí seinnapartin skuldu vit sigla tvørtur um linjuna, og tað vóru 128 fólk umborð, sum ikki høvdu siglt um linjuna fyrr. Kl. 2 kom Kong Neptun umborð. Hann sá gott út við krúnu á høvdinum við trýtindaðari hvísl í hondini. Skeggið rakk niður á øklar. Hann var fylgdur av havfrúgvum og havmonnum og hartil tríggir politistar. Teir skuldu taka sær av teimum, sum ikki vildu vera doyptir góðvilliga. Skiparin var og tók ímóti honum og fylgdi honum so fram á dekkið og hjálpti honum upp á trúnuna. Neptun helt so eina talu fyri børnunum, sum doypast skuldu. Tá hon var liðug byrjaði dópurin. Trý konufólk vóru við sum passaserar, tey vóru fyrst doypt. Áðrenn tey vóru doypt, vóru tey útsmurd við eini blanding av olju og sápu. So tók apotekarin og rakaði teimum við einum stórum brævkníví. Síðani vóru tey blakaði upp í eitt stórt kar fult av vatni og harí vóru tey doypt. Aftaná konufólkini vóru mannfólkini doypt á sama máta 4 og 5 á gangin. Tá ið doypingin var liðug, fingu øll tey doyptu dópsattest við tí nýggja navninum uppiá. Tað var óføra stuttligt at síggja. Tað var dúgliga fotograferað, meðan doypingin stóð uppá. Geologurin hevði sett eina línu út av reyvini á skipinum fyri at vita, um hann kundi fáa nakað fiskaskapilsi á. Línan var av klønum jarntráði. Kl. 11 fyri middag kom ein makrelur á. Hann vá 28 kg.

18. november
var arbeitt á dekkinum sum vanligt. Kl. 3 um morgunin í morgun sigldu vit um linjuna. Ein hvalabátur sigldi tætt fram við okkum í dag. Har var dópur umborð hjá teimum, tað sóu vit. Um kvøldið var ymiskur sportur á dekkinum. Kapprenning og at hoppa í posa. Tað var stuttligt at síggja.

19. november
var arbeitt á dekkinum - serliga við sverar manillatrossar at hava klárar at binda hvalabátar við, tá ið teir komu á borði at fáa sær vatn og olju og aðra útgerð. Tað frættist í dag, at hinir tríggir hvalabátarnir vóru komnir til Dakar í Senegal.

20. november
kl. 8 um morgunin komu hvalabátarnir á borði at fáa sær vatn og olju og alla ta útgerð, sum tørvar, fyri at teir kundu byrja at skjóta hval. Maskinan var steðgað, og so komu teir fyrst "Am 5". Síðani "Am 1" og síðst "Am 2", sum vóru nøvnini á hvalabátunum.

Teir vóru ikki lidnir fyrr enn kl. 7½ um kvøldið. Tá var aftur farið at sigla víðari. Meðan skipið lá stilt, var fult av haium (hávum) rundan um skipið. Hollendarar royndu at fiska teir. Teir fingu 7.

21. november
var ymiskt arbeiði gjørt á dekkinum. Til dømis spleysan av ymiskum veirum og at gera ketur til at binda um stertin á hvalinum, tá hann blívur hálaður upp á dekkið.

*…eg hevði føðingardag, roykti cigar. Vit eru nú á 4 st. S.b.*

22. november
var arbeitt við ymiskt arbeiði og eisini var arbeitt uppá at rudda dekkið fyri eplakassar og aðra útgerð, sum lá á dekkinum.

23. november
var arbeitt sama arbeiði sum vanligt til kl. 1 middag. Tá fingu vit fýraftan. Kl. 4 var boksikampur á dekkinum millum ein hollendara og Johan við Stein, Tórshavn. Johan var við yvirlutan. Síðan var togtogan millum 2 hold av føroyingum uppá 4 mans hvørt móti hollendarum. Bæði tey føroysku holdini vunnu. Johan fekk eina barbermaskinu í premiu. Hini bæði holdini 50 sigarettir pr. mann.

24. november
Sunnudagin 24. november var alt kvirt og friðarligt umborð. Um náttina var skipið vent aftur til ein hvalabát, sum lá við motorskaða. Hann var tikin upp á sleip, og so var ferðin fortsett.

25. november
var mesta arbeiði at rekja upp gamalt manilla til at beklæða veirarnar við, so teir ikki skuldu skamfílast. Skipið siglir 9 míl við einum hvalabáti upp á sleip. Veðrið er gott, men tað er kaldari nú, so nú fer eingin at sólbrennast meira.

26. november
var ymiskt arbeiði gjørt á dekkinum. Á middegi var báturin sleptur leysur, sum vit hava sleipað. Hann var í ordan og vísti seg at ganga væl. Vindurin vísur seg at vera vaksandi móti náttini.

27. november
var sama arbeiði gjørt á dekkinum sum vanligt. Tað var mest spleisan av veiri, ruddan av dekkinum og annað.

28. november
var arbeitt við sama lag á dekkinum. Vindurin veksur við sama lag.

29. november
var arbeitt ymiskt arbeiði á dekkinum. Tað vísir seg soleiðis, sum vindurin altíð er vaksandi móti kvøldið, men hann dettur burtur aftur móti morgni, og um dagarnar er altíð gott veður.

30. november
var arbeitt til kl. 1 um dagin. Tá eru hollendararnir vanir at hava "weekend", og tað er tað sama her umborð. Vit sóu ljósbíløt í kvøld, tey vóru góð.

1. desember
Sunnudagin 1. desember var veðrið av tí allarbesta. Ein hvalabátur fekk maskinskaða, men tað var skjótt, teir fingu hann í ordan aftur.

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein

20. november
- 14,6 stig og lot av norðri. “Akamalik” landaði í morgun, teir hava knapt 570 tons inni eftir 19 døgum.

“Natarnaq” kom eisini inn í dag; teir skuldu ikki koma fyrrenn í morgin, men teir hava maskinbrek, so teir vóru noyddir at koma inn.

“Stennan C” er á veg til Manitsoq at landa, teir hava um 400 tons av rækjum. Teir hava verið heilt norðuri á 72 stigum og roynt. Tað var har, rækjuflotin royndi fyrr.

21. november
“Akamalik” bleiv liðugur at landa um døgurðatíð, og áðrenn teir sluppu avstað, vóru teir noyddir at leggja “Natarnaq” til bryggju, tí teir kundu ikki starta maskinuna, orsakað av maskinbrekinum.

“Markus” stakk snútan inn higar seinnapartin eftir einum manni.

Teir tríggir trolararnir “Akamalik”, “Natarnaq” og “Markus” kostaðu 420 mill. kr., tá teir vóru bygdir. Eg haldi, at eg tori at siga, at so stórt virði á skipum neyvan hevur verið her fyrr.

22. november
Minus 11,9 stig og lot av eystri. “Anna Kiil” er inni og landar jákupsskeljar í dag, teir hava knapt 22 tons. Prísurin er í lagi fyri tíðina, siga teir, um 100 kr. kg. Teir taka skeljarnar við rognum, meðan “Louisa L” tekur uttan rogn.

Sum eg havi skilt, so er “Louisa L” á veg til Danmarkar. Har liggur ein nýggjur (gamal) bátur, sum reiðaríið hevur keypt úr Noregi. Hann hevur havt navnið “Skaregg”, og hann er væl størri enn “Louisa L”. Fabrikkin skal flytast úr “Louisu L” umborð á tann nýggja bátin. Tá teir so koma í gongd við fiskarínum aftur, skulu teir fiska í døgndrift, og ikki sum nú frá kl. 8 um morgunin til kl. 21 á kvøldi.

Bátarnir her hava fingið heilt væl av svartfugli, og teir síggja væl út. Teir royta fuglin, so tað er lagamanni at velja sær tann besta til ein prís uppá 55 kr., og tað er sum sagt fyri royttan lomviga. Óroyttur kostar hann 35 kr.

23. november
- 12,4 stig og lot av eystri. “Lómur” kom inn til Illulissat í morgun at landa, teir hava gott 60 tons hendan túrin. Teir gjørdu eitt rend norður á 71 stig, men har var einki at fáa. Teir mistu knapt 2 døgn í sigling aftur og fram, og sum nú er mugu teir ikki fiska í meira enn 4 døgn, áðrenn teir skulu lossa, so hasi 60 tonsini eru í lagi, verður sagt.



*Kanadiarin “Mersey Phoenix” kom inn at bunkra 1. desember.*

28. november
Minus 12,4 stig og stilli. “Lómur” kom inn til Illulissat at landa í morgun, teir hava gott 100 tons inni.

29. november
- 12,9 stig og lot av norðri. “Ocean Tiger” kom inn at landa í morgun, teir hava gott og væl 300 tons inni. Teir skulu skifta nakað av fólki í morgin, og so skjótt sum tað er orðnað, verður loyst aftur til nýggjan túr.

30. november
Minus 11,2 stig, lot av norðri og greytatjúkt við kavaælingi. “Ocean Tiger” slapp avstað aftur seint seinnapartin.

Flúgvingin hevur verið útsett fleiri ferðir, men so var ein skái, og flúgvarin slapp niður.

“Lómur” slapp ikki avstað fyrr í kvøld. Í Illulissat er eisini sett mark fyri, hvussu nógv skipini kunnu landa, og sum eg havi skilt, kann “Lómur” bert fiska 20 tons um døgnið, og teir kunnu bara fiska í 4 døgn. Teir kunnu nú heldur ikki gera við, at teir fáa meira enn 80 tons í 4 dagar.

“Natarnaq” stakk snútan inn ímóti við einum manni í kvøld.

1. desember
- 13,0 stig í morgun, stilli inni á, men norðan úti til havs. “Polar Natarnaq” kom inn at landa í morgun, teir hava gott 100 tons inni av sekkjarækjum.

Kanadiarin “Mersey Phoenix” kom inn at bunkra. Teir skuldu bunkra frá einum tangabáti, sum var í Norðsjónum í gjár, so nær hann kundi vera hjá teimum á gott 68 stigum og í desembermánaða, var ikki til at spáa um, so teir komu inn higar at bunkra 150 tons. Teir hava 15 tangar at fylla í, og íalt taka teir 800 tons.

Maskinsjefurin umborð, Esmar Hansen úr Klaksvík, segði, at teir brúktu um 18-1900 litrar um døgnið. Maskinan er uppá 8.000 hestar. Tað valdaðist, hvussu nógv trol teir brúktu, teir brúka upp í 3 trol. Teir eru á rækjuveiði, og teir hava verið úti í knappar 6 vikur og hava gott 600 tons inni. Síðsta túrin landaðu teir 834 tons, men tað var eisini ein langur túrur uppá knappar 8 vikur.

Sum eg skilti á Esmari, so var frystiorkan ikki tann heilt stóra hjá teimum - um 80 tons um døgnið. Eg spurdi hann, hvussu lønin var, og hann læt væl at, og hann segði, at mannskapið hevði einki við oljuútreiðslur og annað, sum kom umborð, at gera. Teir høvdu ein sáttmála, sum ljóðaði uppá 36% til alt mannskapið.

Teir fóru avstað aftur, beint sum slangan var komin upp á land og hann hevði skrivað undir.

Trolarin er 4 ára gamal, hann kom í september 2004 og er bygginummar 126, og “Markus” er bygginummar 127. Eg eri ikki heilt vísur í, at teir eru líka stórir, men “Mersey Phoenix” sær út til at vera breiðari í mínum eygum.

“Manu” er inni í Manitsoq og landar svartkalva. Teir hava knappa fulla last inni. Kvotan hjá teimum er við at vera liðug, og teir hava um knappa hálva last eftir at fiska. “Manu” tekur gott 200 tons.

Trolarin “Sisimiut” kemur til Nuuk sunnunáttina, og so er ætlanin, at teir fara at sigla til Kollafjarðar at landa. Síðani fara teir á skipasmiðju, og so í Barentshavið eftir nýggjár.


## Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: Postboks 2114, FO-165 Argir, ella at ringja á tlf. 31 60 89 (svarar eftir arbeiðstíð) ella leggja boð á telefonsvararan.

Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. desember 2006.

Hjálpargrunnurin



Klaksvíkar Sjúkrahús

## Deild A Sjúkrarøktarfrøðingar

Søkt verður eftir 2 sjúkrarøktarfrøðingum at arbeiða 0,6 tíð í náttarvakt frá 01.02.07 ella eftir nærri avtalu.

Førleikakrøv
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska økið
- Góð samstarvsevnir

Lønar-og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um størvini frá: Anna Løve Sørensen, deildarsjúkrarøktarfrøðingur deild A, tlf. 454545 lokal 511, ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisation og møguligum viðmælum skulu sendast til: Klaksvíkar Sjúkrahús, Umsjónarmaðurin, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 18.12.2006.



## Haldið FF-blaðið



Vit hava útgerðina



| | |
|---|---|
| Flótitrol | Snurpunótir |
| Botntrol | Aliútgerð |
| Rækjutrol | Annað |

VÓNIN

Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 474 200
Telefax 474 201

Tórshavn:
Vestara bryggja 12
100 Tórshavn
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

info@vonin.com - www.vonin.com

# Á ferð við Menakhem



*Foreldrini hjá Menakhem. Bæði myrd av nasistunum.*



*Menakhem saman við systrini.*



*Systirin, myrd av nasistunum.*



*Amerikansk herskip sum í 1948 ansar eftir, at Ísrael ikki skal fáa vápn at verja seg við.*

Tað er ótrúliga stórur munur á at koma til eitt land, tá ein kennir onkran, og tá ein ongan kennir.

Ferðin til Ísrael hevði undir øllum umstøðum verið góð, men vit fingu eitt heilt annað og betri innlit í viðurskiftini í landinum, tá vit kundu vera nakrar dagar saman við Honnu og Menakhem Ben Yami. Umframt tað, at tey vita nógv og hava upplivað nógv, so hava vit eisini fingið fleiri áhugaverdar myndir úr teirra savni.

M.a. fingu vit myndir av foreldrum hansara og systrini. Vit hava áður greitt frá, at Menakhem er polskur jødi, og búði saman við foreldrunum og systrini í ghettoini í Warszawa í Polandi. Nazistarnir beindu fyri teimum øllum trimum. Kortini eigur Menakhem myndir av teimum, og tað kemst av, at foreldrini undan krígnum sendu myndir til skyldfólk í Palestina. Hesar myndirnar hevur hann nú sum minnir. Av tí at vit ikki høvdu hesar myndirnar, tá vit skrivaðu søguna um Menakhem, verða tær tiknar við í hesa greinina.

## USA hevur ikki bert stuðlað

Menakhem kom til Ísraels heilt stutt eftir at kríggið endaði, og hevur hann tískil verið við til at byggja landið upp heilt frá byrjan, m.a. við luttøku í teimum kríggjum sum hava verið.

Vit hava hildið, at USA alla tíðina hevur verið fremsti stuðul hjá Ísrael, men so hevur ikki verið. Eftir samtyktina í ST í 1947 um at jødarnir skuldu fáa Ísrael, royndi USA at draga í land aftur og at fáa eina aðra loysn, men hetta vildu ísraelsku leiðarar ikki hoyra talan um.

Tá so Ísrael varð álopið av arabarum dagin eftir, at tað varð stovnsett, royndi USA at forða fyri, at teir fingu vápn. Á pappírinum var henda blokadan galdandi fyri øll londini í krígnum, men tey arabisku londini høvdu aðrar møguleikar at fáa vápn, og tí gekk henda blokadan fyrst og fremst út yvir Ísrael. Men – sum vit greiddu frá í søguni um Teddy Kollek – høvdu ísraelsmenninir garderað seg, og Ísrael hóraði undan.

## Gjørdist fiskimaður og -frøðingur

Vit hava áður greitt frá, at Menakhem gjørdist fiskimaður og skipari á einum fiskibáti. Sum frá leið kom hann at virka sum fiskivinnuserfrøðingur í øðrum londum. Fyrst fyri ísraelsku stjórnina og síðan fyri FAO, matvørustovnin hjá ST.

Í hesum sambandi hava Hanna og Menakhem verið í mongum londum at læra fiskimenn at fáa meira burtur úr veiðuni. Ein vegur var at útvega tøkni, ein annar var at skriva lættlisnar lærubøkur fyri fiskimenn, sum skuldi siga teimum, hvussu tøknin skuldi nýtast. Hann hevur m.a. ein einfaldan hátt at máta hitan í sjónum, eisini niðri á botni. Eitt epli skuldi søkkjast á botn við einum søkki. Eftir eini løtu skuldi tað dragast upp, og so varð eitt termometur potað inn í eplið, har hitin var tann sami sum á botni. Eftir eini lítlari løtu kundi hitin lesast av.

Hanna og Menakhem búgva nú í Ísrael í einum lítlum býi nærindis Haifa, og her er sera friðarligt. Tey ferðast framvegis nógv, tí Menakhem luttekur enn á fiskivinnufundum kring heimin, eins og hann er ráðgevi hjá myndugleikum og vinnu. Ofta er Hanna við honum, og hava tey eisini verið í Føroyum.

Her skal verða nevnt, at tann drúgva frágreiðingin, sum Menakhem gjørdi um ferðina higar, verður nú týdd til føroyskt. Hon verður prentað her í blaðnum, eins og hon verður partur av komandi ársfrágreiðingini. Tá verður hon eisini at síggja á alnótini.

## Tvífald synd

Hanna og Manakhem eru at kalla meira "verðsligir jødar" ella, sum vit vildu sagt í Føroyum, "vanlig kirkjufólk".

Tey taka ikki teir jødisku siðirnar so álvarsliga, men tey kenna teir allar. Tá ein av føroysku ferðafólkunum greiddi frá, at hon til fánýtis hevði biðið um eina tvíflís við "cheese and ham", fekk hon at vita, at hetta var tvífald synd. Fyrst tað at biðja um "ham", sum er grísakjøt og ikki loyvt jødum at eta og so eisini at biðja um ost. At blanda saman kjøt og mjólkaúrdráttir er heldur ikki loyvt eftir jødiskum forskriftum.

Eitt dømi afturat hesum er, at hotellini hava serligar "sabbatslyftir", sum av sær sjálvum steðga við hvørja hædd. – Vit hava fyrr her í blaðnum greitt frá ortodoksum jødum, at teir ikki mugu gera nakað ónyttugt sabbatin – ikki so mikið sum at trýsta á knøttin til ta hæddina, har elevatorurin skal støða! Tí vera "sabbatslyftir" nýttar sabbatsdagin, so sleppast kann undan at trýsta á knøttin.

## Fáa ókeypis streym

Menakhem greiddi frá fakfelagsviðurskiftum og viðurskiftunum annars hjá løntakarum. Í Ísrael er tað Histradut, sum er tann stóra samtøkan av fakfeløgum. Histradut hevur frá byrjan verið ein partur av arbeiðaraflokkinum. Hesin hevði stjórnarvaldið tey fyrstu nógvu árini í søguni hjá Ísrael. Histradut hevur havt størri týdning fyri Ísrael enn t.d. LO hevur havt í Danmark, tí teir hava eisini staðið fyri nógvum av teimum vinnusamtøkum, sum hava verið í landinum.

Sum alt annað er hetta eisini broytt. Tann dagur mátti koma, tá tað ikki longur var Arbeiðaraflokkurin, sum hevði monopol upp á at stýra landinum, og teir høgrahallu tóku við. Hetta hevur minkað um valdið hjá Histradut, og hetta hevur aftur broytt viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum, har løntakarin er undir støðugum trýsti. M.a. verða teir trýstir at gera persónligar sáttmálar um lønir, har hetta átti at verið nakað, sum fakfeløgini tóku sær av.

Lønarlagið í Ísrael er annars soleiðis, at tað er ein minstaløn upp á kr. 7.000 um mánaðin. Ein "vanlig" mánaðarløn liggur um 14-18.000 kr., og sostatt er lønarlagið lægri enn í Føroyum.

Menakhem greiðir annars frá, at tað kortini er eydnast í summum førum at varðveita vunnin rættindi. Hetta er m.a. galdandi fyri tey, sum arbeiða á elverkum. Í byrjanini – "fra tidernes morgen" – fingu hesi við í sín sáttmála, at tey skuldu fáa ókeypis streym. Hetta var ikki hildið at hava so nógv upp á seg tá, tí tá vóru tey so fá, sum arbeiddu á elverkunum, og tey hava kanska bert havt nakrar fáar perur at byrja við, so tað kundi ikki vera tann stóra streymnýtslan.

Men eisini her er ein stór broyting hend, og nú er hesin ókeypis streymur nakað, sum ger mun – bæði hjá løntakarum og virkjunum. Roynt hevur verið at sleppa burtur úr hesi skipan, men tað vilja fakfeløgini ikki, tey siga korta nei. Tískil er lætt at síggja, hvar elverksarbeiðarar búgva, tí hjá teimum verður ikki spart upp á streymin.

## Valskipanin

Menakhem heldur eisini, at tað er brúk fyri eini nýggjari valskipan. Og kann politikkurin tykjast at vera fløktur her hjá okkum, so er tað lítisvert í mun til støðuna í Ísrael. Meðan vit hóast alt bert hava 6 flokkar, so vóru tað ikki færri enn 31 flokkar, sum stillaðu upp til seinasta val til Knesset í Ísrael. Nógvir av teimum fingu tó fáar atkvøður, og sperrumarkið er 2%. Hetta merkti, at "bert" 12 flokkar komu í tingið, sum hevur 150 limir. Tann størsti flokkurin, Kadima, fekk 29 sessir, og tá skal framvegis nógv til afturat fyri at kunna skipa eina samgongu.

Býtið millum flokkarnar er, at teir verðsligir flokkarnir standa øðrumegin og teir religiøsu hinumegin. Ofta er neyðugt at fáa ein religiøsan flokk við í eina samgongu fyri at fáa meirilutan, og hesir kunnu so seta treytir, sum eru heilt órímilig-



Her roynir Menakem at leggja fiskimonnum í Afrika lag á.



Her heldur hann fyrilestur um fiskiskap.

ar, tá tær verða mettar út frá einum verðsligum sjónarmiði. Men hesir sleppa ofta ikki undan teimum settu treytunum. Úrslitið er so, at teir fáa nógvar stjórnarkreppur, sum gera tað torført at stýra landinum.

Menakhem heldur, at tað fyrst og fremst er neyðugt at fáa sperrumarkið upp fyri at minka um talið á flokkum. Hetta kundi so gjørt, at flokkar vórðu noyddir at leggja saman. T.d. eru fýra arabiskir flokkar, har tað eins væl kundi verið ein.

Um tað vóru færri flokkar, so hevði tað verið lættari at skipa samgongur, sum so aftur hevði havt við sær, at stjórnarvaldið var meira støðugt.

Ísrael er eitt valdømi. Hetta er tað, sum nógv í Føroyum eru forsprákarar fyri. Men Menakhem heldur ikki, at tað riggar væl, tí hetta ger, at veljararnir ikki hava "sín egna" tingmann, sum teir kunnu samskifta við. Hann vil nógv heldur hava fleiri valdømi – sum her hjá okkum – og vil hetta skapa nærri samband millum tingmenn og veljarar.

Tað kann verða nevnt, at bæði forsætisráðharrar og borgmeistarar verða valdir við beinleiðis vali.

Í næstseinasta blaði høvdu vit eina frásøgn um gamla borgmeistaran í Jerusalem, Teddy Kollek. Hann varð í 1993 avloystur av Ehud Olmert, núverandi forsætisráðharra, sum sat fram til 2003.

Tá varð hann avloystur av Uri Lupolianski, sum er ultraortodoskur jøði, og hoyrir til ein lítlan minniluta í býnum. Hvussu kundi tað so bera til bera til? Jú, tað var tí, at tað vóru so nógv borgmeistaravalevni at velja ímillum, men teir ultraortodoksu vórðu samdir um at standa saman og velja sama mann, sum tískil fekk flestar atkvøður og vann valið.

Hetta átti so at givið Lupolianski trupulleikar við hinar býráðspolitikkarnar, sum umboða heilt onnur sjónarmið. Men hetta riggar hóast alt væl. Borgmeistarin dugur væl at samstarva til allar síður.

Tann stóra gølan beint nú var um forsetan í landinum, sum er ákærdur fyri at hava neyðtikið fleiri kvinnur. Eingin skilir, hvussu hann kann sleppa undan at leggja frá sær.

### Drusar

Ísrael er eitt sera samansett samfelag. Fyrst eru tað jøðar, sum eru komnir úr øllum heimshornum, og frá sera ymiskum umstøðum.

Síðani eru nógv onnur fólkasløg, sum t.d. nógvar ættir av arabarum og ein serstakur ættarbólkur eru drusar, sum eisini búgva í Libanon og Sýria og einir 80.000 búgva í Ísrael – á Karmelfjallinum og á Golanheyggjunum.

Á okkara ferð saman við Menakhem vitjaðu vit ein drusarbý á Karmelfjalli, har tað búgva eini 10.000 fólk. Tað er ringt at siga, hvørjir drusarnir í veruleikanum eru. Teir brutu við islam í 900-talinum, og framvegis er kalt teirra millum. Drusar kunnu ikki torga muslimar. Menakhem sigur, at ein tann mest fíggindaliga sinnaði limurin í Knesset mótvegis arabarum júst er ein drusi.

Teirra trúgv hevur ymisk íkast – bæði heiðin, muslimsk og kristin – men tað eru bert "teir lærdu", sum kenna innihaldið í teimum 111 lærusetninginum, so her er bert at trúgva hjá tí vanliga manninum. Hann fær einki at vita um, hvat hann trýr uppá, fyrr enn hann er um 30 ár, og tá er einki við at seta spurningar. Teirra serligi profetur er Jethro, sum var verfaðir Mósesar. Tað ber ikki til hjá uttanfyristandandi at taka við teirra trúgv. Drusar kunnu bert giftast við sínum egnu. Tað eru dømi um heiðursdráp av gentum, sum hava brotið hesar reglur. Annars eru drusar sera tollyntir móti øðrum.





Hanna var eisini við, tá Menakhem var á ferð. Her heldur hon á einum krabbapotti.



Drusarakona í eini matstovu. Her arbeiddi hon saman við synum, sum kendu væl Føroyar: "Football, football!"

Drusar eru vanliga loyalir móti tí landi, sum teir búgva í, bert teir sleppa at búgva í friði við síni trúgv. Tí hava ísraelskir myndugleikar størri álit á drusum enn á arabarum, sum ikki hava tvungna herskyldu. Tað hava hinvegin drusar á Karmel, men ikki teir, sum búgva á Golanheyggjunum. Hesir eru eitt sindur afturhaldnir við sínum loyaliteti mótvegis Ísrael, tí teir vita ikki, um teirra øki aftur fer at gerast sýriskt, og tá kann tað koma aftur um brekku at vera ov vinarligir mótvegis Ísrael.

Drusar hava síni serligu handaverk, m.a. at gera glas sum nærum ikki brotnar. Hetta prógvaðu teir eisini í handli, har teir bukaðu glasið í diskin við fullari megi uttan at tað skalaðist. Sjálvsagt mátti eitt slíkt glas keypast og roynast, tá komið varð heim. Men tá brotnaði tað við fyrsta slag! Kanska er nakað av fuppi uppi í!

Drusar á Golan eru kendir fyri at dyrka súreplir í stórum mongdum. Hesi hava ein heilt serligan góðan smakk, sum minnir um ananas.

### Samverjar

Vit kunnu eisini nevna eitt serligt fólkaslag í Ísrael, sum er sera kent frá bíbliusøguni við søguni um "hin miskunsama samverjan". Samverjar rokna seg sum teir sonnu jødarnar, og teir byggja sína trúgv á Toruini og Josva Bók. Teir búgva í Holon sunnan fyri Tel Aviv og við Nablus, har teir bygdu sítt egna tempul, tá jødarnir í árinum 538 undan Krist útilokaðu teir frá templinum í Jerusalem. Teir verða eisini viðurkendir sum jødar.

Tað eru bert umleið 600 samverjar til, og vanliga gerandismál teirra er arabiskt, men til gudstænastur tosa teir tað gamla hebraiska málið. Teir gifta seg bert við kvinnum av síni egnu ætt. Í hvussu er skal ein fremmandur fyrst taka við teirra trúgv, áðrenn hann kann giftast við einum samverja.

Vit fara sostatt at enda okkara frásagnir úr Ísrael, um ikki okkurt serligt verður at frætta. Vit vóna, at lesarin hevur hildið hesar frásagnir vera øðrvísi og áhugaverdar.

# “Føroyskt” flakavirki í Kina

Zakarias Wang hevur júst verið í Kina og opnað eitt “føroyskt” flakavirki.
Vit hava fingið frásøgn frá honum um ferðina. Her er sanniliga nakað at hugsa um!

Á Kaldbaksfirði svimja nøkur alisíl. Tá tey verða tikin, verða tey heilfryst, løgd í konteynarar og send til Kina. Har verða tey løgd upp á land og skorin í bitar, sum skulu vera júst 7 gramm, ikki 6 og ikki 8 gramm! Teir verða síðan aftur verða og sendir víðari til Japan, har teir verða brúktir til sushi, ein ráan fiskarætt, sum japanarum dámar sera væl. Teir eru ógvuliga kræsnir og hava ráð til at gjalda nógv fyri tað, sum teir halda vera best, og teir siga, at hesi síl úr Føroyum eru so nógv tey bestu til henda rættin. Orsøkin er helst bæði ættarbregði og fóðring. Hetta er tann sílaættin, sum føroyingar hava arbeitt við leingi, og meðan nógv síl aðrastaðni fáa fóður við nógvum plantutilfari í, so er føroyska fiskafóðrið í mestan mun av fiskauppruna, og tí meira í samsvari við tað sum síl eta tá tey liva í náttúruni.

Tann fyritøkan sum skipar fyri hesum arbeiði, er japonsk og eitur SNG, sum er ein stytting av Shih Nihon Global Incorporated. Tað eru fleiri japanskar fyritøkur innan fiskivinnuni, sum eru gingnar saman um eitt slag av holdingfelag og hava fingið stovnarar úr øðrum londum til at vera við. Ein av teimum er frá Filipsoyggjunum, og hann býr í USA og hevur tí útflutningin frá Alaska undir sær.

Ringt er sum kunnugt at hava hjallin á sjónum, og SNG hevur tað sum so mongum gingið upp og niður. Í Kina gekk mest niður í fyrstuni, tí japanar komu og skuldu skipa fyri har, og tað dáma kinesarum ikki. Men so fingu teir ein kinesiskan stjóra, og tá fekk málið aðra vend. Nú hava teir trý flakavirki í Kina, og tað er ov lítið, og tí hevur verið neyðugt at gera eitt fjórða, og týsdagin 28. november læt hetta virkið upp.

### Virkið í Dalian

Hetta virkið er í Dalian, ein býur miðskeiðis millum Beijing og Korea. Dygst við hava vit herflotastøðina Port Arthur, har russar vórðu avsmurdir av japanarum í russiskajapanska krígnum 1904-05. Dalian er ein av teimum 32 býunum í Kina, sum hevur meir enn eina millión íbúgvar, og har eru einar fimm milliónir. Býurin er vaksin skjótt, og í miðbýnum eru háhúsini tøtt. Í býnum er eitt stórt torg, har hús frá russaratíðini standa beint framman fyri háhúsunum. Russar grundløgdu býin í 1899, tá ið teir ráddu har. Eftir kinesiska-japanska kríggið 1894 fingu japanar henda landslut, men eftir friðin keyptu russar hetta umráði frá Japan og lótu jarnbreytina gjøgnum Sibiria enda her. Eftir seinna heimsbardaga fingu teir hetta umráðið aftur, og sleptu tí ikki fyrr enn í 1955, eftir at Stalin var deyður. Ein stór sementfløta oman móti fjøruni er í 1999 gjørd sum 100 ára minnisvarði um russisku stovnsetingina av býnum.

Býurin er ein partur av einum búskaparligum frísona, og eru fleiri slíkar fram við sjóvarmálanum í Kina. Har sleppa útlendsk feløg at gera íløgur og fáa skattafyrimunir. Á hesum leiðum eru einir 2000 ferkilometrar, sum ikki eru nakað serliga væl hóskandi til landbúnað, men kunnu brúkast til byggilendi. Har er slætt, men tá SNG skuldi byggja vísti tað seg at ringt var at fáa botn, og tá av tornaði máttu teir gera sum í Hálandi, dríva bjálkar 150 m. niður í jørðina, men tá bar til.

Beint fram við hesum flakavirki verður ein motorvegur gjørdur á súlum hægri enn flakavirki er. Hetta er nýggi motorvegurin ímillum Dalian og høvuðsstaðin Beijing, og tá hann er liðugur um nakrar mánaðir, fer tað bert at taka 6 tímar at koyra millum hesar býir.

### Føroyingur á odda

Tað eru ikki bara síl sum gera, at føroyingar hava nakað við hetta virki at gera. SNG hevur eina deild í Europa, og á odda fyri henni stendur havnarmaðurin Carl á Lag, og europeiska høvuðssæti fyri hesa multinationalu fyritøkuni er í Havn. Deildirnar í hinum londunum í Europa standa tí undir Tórshavn.

Carl hevði fingið nakrar føroyingar at koma við sær, og vóru vit sjey í ferðalagnum, sum var við til at lata virkið upp. Forboðið var at taka myndir inni á virkinum, men fingu vit at vita, at uttanfyri kundu vit fotografera alt vit vildu.



*Zacharias Wang á kinesiska múrinum*



*Flakakvinnurnar ílætnar sum rætttrúgvandi muslimar*




*Framførsla í Kina*

Vit vórðu deild upp í fimm fylki, og vit føroyingarnir komu í tað fimta. Vit sóu alla verksmiðjuna, og hvørja ferð vit komu inn í eina nýggja deild, var har ein rúgva av fólki, sum fagnaðu okkum. Tey vóru í arbeiðsklæðum, og sóu rættiliga muslimsk út. Hár, munnur og nøs vóru innballað, so bert eyguni sóust og tey arbeiddu í handskum.

Tey, sum arbeiða her, koma úr tí innara fátæka partinum av Kina. Sum kunnugt hevur Kina gjøgnum søguna verið eitt sera framkomið land. Tá Adam Smith í 1776 skrivaði stóra verk sítt um Eyð tjóðanna (The Wealth of Nations) roknaði hann Kina fyri at vera framman fyri bæði Ongland og Frakland. Men so tóku hesi og onnur seg framum, og fyri nøkrum fáum árum síðani var Kina eitt tað fátækasta landið í heiminum.

Men síðstu 25 árini er vend komin í. Búskaparvøksturin í Kina hevur ligið um 9% um árið, meðan hann í Europa hevur havt ilt við at tátta upp í 2%.

Hetta eru ørandi tøl, og ein og hvør kann siga sær sjálvum, at heldur hetta fram, so fer Kina búskaparliga at vera javnbjóðis við vestureuropa um ikki so langa tíð. Men enn er nógv eftir, og serliga er vert at leggja til merkis, at búskapargongdin í Kina er sera ójøvn. Tað er fram við sjóvarmálanum, at tað nýggja hendur. Inni í landinum liva fólk í tí svørtu armóð, og haðani ber til at fáa fólk at arbeiða í tí framkomna partinum av landinum fyri sera lága løn.

### Tímalønin er uppá seg stór, heilar 3 krónur

Tað er hetta sum ger seg galdandi fyri SNG eisini. Teir fáa ungar gentur til at arbeiða upp á tveyára sáttmálar. Tær fáa innivist undir til tað góðum umstøðum og fáa upplæring í tríggjar mánar. Lønin er ikki stór eftir tí vit eru von við, einar 900 kr um mánaðin fyri 60 tíma viku. Hetta ljóðar ikki av nógvum, men har tær koma frá hava vit landslutir, har miðalinntøkan fyri bygdarfólkið er minni




*"Føroyska" flakavirkið í Kina*

enn 1.000 kr. um árið fyri eitt heilt húski, so valkosturin er ikki nakað serligur. Av tí at lønirnar eru so lágar, loysir tað seg ikki at nýta maskinur til flakaskering, og á flakavirkinum fara eini 2000 fólk at arbeiða.

Alt var nýtt at síggja uttan tólini, sum tóktust at vera høvuðsumvæld.

Hildið var, at hetta arbeiði var væl úr hondum greitt, men annars klaga kinesiskir myndugleikar um, at teir hava ov lítið av handverkarum. Av tí at foreldur síðani í sjútiárunum bert hava fingið loyvi til at fingið eitt barn, royna tey at geva børnunum so góða útbúgving sum møguligt, og tá er ofta talan um akademiska útbúgving. T.d. verða í hesum árum einir 250.000 verkfrøðingar lidnir í USA á hvørjum ári, men í Kina er talan um 700.000!

Men fleiri av hesum akademikarum fáa ikki arbeiði í sínum faki, tí at útboðið er ov stórt. Tann sum tók sær av okkum felagsins vegna í Dalian og gjørdi skrivstovuarbeiði har, var maskinverkfrøðingur, men hevði ikki arbeitt í fakinum. Samstundis vísir tað seg, at ov fáir handverkarar fáa útbúgving, og tí klárar landið seg ikki nóg væl í kappingini um "finish", t.v.s. at gera eina vøru heilt lidna, annaðhvørt talan er um skip ella maskinur. Nú ætla teir so at gera nakað við hetta, og sambært komandi fimmára ætlan skulu 36 milliónir handverkarar fáa útbúgving.

Meðan tað knípir við at hava nóg góðan kvalitet á maskinum, so eru teir heilt frammaliga á annan hátt. Eitt nú frysta vit fisk niður í 20 gradir, men teir brúka ofta at frysta niður í 60 gradir. Teir siga at góðskan av fiskinum verður munandi betri á tann hátt.

### Abbin var saman við Mao við í longu ferðini

Eftir at hava sæð virkið fóru vit út í tún og fingu sess millum tey fínu, meðan arbeiðsfólkini stóðu rundan um heiðursgestirnar. Har tosaðu góðir menn. Býráðsformaðurin í Dalian, sum er varalandshøvdingur í hesum landsluti, var ein. Annars var aðalstjórin í SNG har. Hann er japani og eitur Yoshimoto Kajikawa. Tað er hann sum setti kinesiska stjóran Shen Bin í starv. Tá hevði tað gingist so illa í Kina, at fyritøkan var um at fara á húsagang. So møttust hesir menn av tilvild á einum vertshúsi í Tokyo, Shen var farin heimanífrá fyri at lesa til verkfrøðing í Japan og dugdu tí japanskt. Hann segði, at um hann gjørdist stjóri í kinesisku deildini, so skuldi hann fáa vend í, tí hann kendi øll tey í Kina sum høvdu nakað at siga. Hetta kom av tí at abbi hansara hevði verið herovasti hjá kinesisku kommunistunum og hevði verið saman við Mao og Deng á gonguferðini miklu, tá teir flýddu úr Suðurkina til útnyrðingspartin av landinum í 1934. 100.000 fóru avstað, tíggjundaparturin kom fram, og 15 ár seinni høvdu hesir 10.000 vunnið alt landið. Yoshimoto helt ein slíkan kjans vera ov góðan til at lata fara aftur við borðinum, og hann tók av tilboðnum frá Shen.

Shen hevði so eisini orðið, og hvørja ferð ein av kinesarunum talaðu, varð røðan so hvørt týdd til japanskt, og øvugt tá japanararnir røddu. Teir høvdu eitt kór at syngja, og drekadansur var eisini. Hvør dreki er gjørdur av tveimum monnum, og at enda stendur annar á økslunum á hinum, væl fjaldir aftan fyri teppini við drekatekningum. Tá hetta var liðugt kom fýrverkið.

Kanónir spýðu út pappírspetti, ballónir fóru til himmals upp, og so komu rakettirnar við miklum brestum til at ræða burtur allar teir illu andarnar, sum kunnu hótta eitt slíkt virki.

Veðrið var gott, tí tað var hvørki regn ella vindur, men kalt var tað, frost í luftini, og stórir og heitir hernaðarfrakkar vórðu býttir út til allar kuldakrákur. Framførslan tók 40 minuttir, og so kundu vit øll sleppa okkum inn aftur á virkið.

Ein av teimum gestunum sum var við henda dagin var innanríkismálaráðharrin í Kina. Tá eg kom aftur til Keypmannahavnar við flogfarinum kom eg at tosa við ein verkfrøðing frá einari stórari danskari fyritøku, sum hevði tvær verksmiðjur í Kina. Hon breggjaði óført um virki sítt, men tá eg fortaldi, at eg hevði verið saman við innanríkismálaráðharranum, tá gjørdist hon púra paff og undraði seg yvir hvørji sambond vit høvdu, sum kundi fáa slíkt í lag. Men hetta er so bara Shen Bin fyri at takka.

### Vóru eisini á múrinum

Vit fingu eisini tíð til at vera turistar í Kina. Á heimvegnum vóru vit ein heilan dag í høvuðsstaðnum Beijing, og tá nýttu vit høvi til at fáa ein av teimum mongu bilunum til at koyra okkum út at hyggja eftir tí múri, sum kinesararnir fóru undir at laða einar seks øldir fyri okkara tíðarrokning og sum í støðum er dupultur. Tí verður sagt, at hann er 6.500 km langur. Nógva staðni er hann niðurdottin, men á hesum strekki í útnyrðing av Beijing er hann umvældur, og hagar koma nógv ferðafólk. Har er tí eisini ein marknaður fyri vørum, sum hava nakað við múrin at gera, minnislutir og tílíkt, og sum alla staðni, har ein marknaður er, kemur onkur at síggja til at fólk fáa tað, tey leingjast eftir, og har vóru sanniliga nógv handilsfólk! Tey bjóðaðu vørurnar fram, ikki bert har bilur okkara støðgaði, men allan vegin har vit gingu.

Hetta strekkið av múrinum er tað, ið er hægst, einar 800 metrar oman fyri sjóvarmálan. Har kemur veturin skjótt, og seint kemur várið, og tá vit vóru har, var í so kalt, men vit fingu varman av at ganga úr skarðinum upp á næsta fjallatindin, og har vóru brattar trappur at ganga eftir. Uppi á tindinum var eitt torn, og har sást, hvar ið varðmenninir høvdu staðið og hildið eygu eftir fíggindunum, sum vóru á rossabaki, men ongan møguleika høvdu fyri at koma upp um henda 12 metur høga múr. Tær ferðir, ið fíggindarnir komu yvir um, var tað við sviki.



*Carl á lag, sum stendur aftan fyri virkið*

### Kunnu læra kinesiskt eftir hálvum ári

Fólkini vit hittu, vóru blíð, og prísirnir vóru lágir. Fleiri dugdu nakað av enskum, men tað sigur seg sjálvt, at fyrimunurin av at duga fólksins mál er stórur. Í so máta kom eg nú ikki so langt. Eg keypti tó eina orðabók. Hon var ein kinesisk orðabók, sum í tí kinesisku útgávuni var prentað í meir enn 40 milliónum eintøkum. Nú høvdu teir so lagt eina enska týðing afturat, og man tað tí vera tann besta orðabókin. Men hava fólk hug til at læra seg málið, so ber til at koma á skeið har yviri. Eitt skeið sum tekur eitt hálvt ár og kostar tíggju túsund krónur við øllum íroknað, er nóg mikið til at læra at tosa málið. Men skal lærast at lesa, so er neyðugt við longri tíð.

Tað verður skrivað við einum skrifttekni fyri hvørt orð, og neyðugt er at kenna eini 1500 tekn fyri at kunna lesa eina avís.

Vit takka Zakarias fyri hesa áhugaverdu frásøgnina. Nú verður spennandi hvussu tað fer at gangast í Kina.




# Kokkanæmingar hjá Palla Bager

Vit høvdu fyrr í ár eina frásøgn um Palla Bager og hansara kokkaskúla. Vit hava frá Fornminnissavninum fingið hesa forvitnisligu næmingamyndina, sum stavar frá 1937 ella 1938.

Vit kenna ein á myndini. Nr. 5 er Ove Olsen, ættaður úr Norðdepli, seinni búsettur í Klaksvík, f. 1917.

Ber onkur kenslu á onkran av hinum, vilja vit fegin frætta.

# Viðvíkjandi tøku av ísi v.m.

Dan R. Petersen hevur ført fram sum eitt høvuðsmál hjá sær, at hann ikki hevur fingið løn fyri at taka ís, tá hann sigldi við ísfiskatrolarum.

Tá talan er um at taka ís og arbeiði millum túrar, eru greiðar reglur, sum eru grundaðar á, at FF ikki hevur møguleika fyri av sínum eintingum at vita, hvat fólk arbeiða millum túrar. Her hevur stýrimaðurin ábyrgdina av, at slíkt arbeiði verður uppgivið til reiðaríið. Um hetta ikki gevur úrslit, eigur uppgerðin at verða send til FF, sum so tekur evt. rættarlig stig at fáa peningin.

Tað er rætt, at Dan Petersen ofta hevur tosað um ístøku við okkum og vit hava eisini innskerpað reiðarum, hvat sáttmálin sigur, men krav kann einki setast uttan dokumentatión fyri tí.

Til seinastu samráðingar fyrst í 2005 varð hesin spurningur tikin upp við Reiðarafelagið, og var hann grundaður á, at menn eins væl vildu sleppa undan at verða órógvaðir av slíkum arbeiði millum túrar.

Í sáttmálanum stendur annars, at fiskimenn skulu bert gera skip út til nýggjan túr, um fólkatrot er á landi. Vísandi til hesa reglu varð gjørt eitt protokollat í 2005, sum segði, at "tá skip er í havn skal manningini órógvast minst møguligt, tó soleiðis at neyðugt arbeiði verður gjørt".

Hetta protokollat, sum Dan saktans kann kanna sær, skuldi loyst møgulig ivamál á hesum økinum, og síðan hevur eingin vent sær til okkara um ístøku.

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

AGN

sild
saury
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur



...dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR
STRENDUR
telefon: 448095 · fax: 448744




## Týðiligur kristindómur

"Men Stefan, gjørdi, fullur av náði og kraft, undur og stór tekin millum fólkið"

*Ápostlasøgan 6, 8 og 8, 1*

Stefan er ein av sjónligastu kristnu persónmenskum, sum í heilatikið er lýst í Nýggja Testamenti. Tá ið Halgabók skal geva eina mynd av honum, brúkar hon útsøgnir sum, at hann var ein maður, fyltur av trúgv og heilagum anda, og fullur av náði og kraft. Hansara kristindómur var ein veruleiki, ið fylti hann heilt, og kristna eyðkenni hansara var millum annað trúgv og andi, náði og kraft.

Slíkur persónur talar til okkara um týðiligan kristindóm. Og í øllum tí nógva og flókta átrúna, vit síggja í dag, hvar markið millum kristiligt og verðsligt gerst tokutari og tokutari, tí menniskju duga ikki at síggja, hvat er verðsligt og hvat er andaligt, kann sigast, at tað júst er ein slíkan mann, vit treingja at setast andlit til andlits við. Alt tað verðsliga og hálvkristiliga roynir at viska burtur markið og lokka hjørtuni inn í ein vandamiklan heilaspuna.

Søgan um Stefan fyllir ikki nógv, men tað er sonn dygd í henni. Hon sigur fyri tað fyrsta, at greiður kristindómur skapar árin og andaligan førleika.

Fyri tað næsta, so vekir týðiligur kristindómur mótsøgnir. Stefan var nógv elskaður, men eisini nógv hataður.

Fyri tað triðja, so skapar týðiligur kristindómur sanna og týðiliga veking.

Og fyri tað fjórða, so gevur týðiligur kristindómur fullan sigur í deyðanum.

Alt hetta kanst tú lesa í søguni um Stefan í Ápostlasøguni.

Gævi vit kundu prædikað soleiðis, at kristindómurin gjørdist týðiligari og greiðari, so einki var at fara skeivur av, tá ið menniskju lurta eftir orðinum. Amen!

## Trý valevni til felagsformansvalið

Tá freistin at stilla upp til felagsformansvalið í Føroya Fiskimannafelag var úti mánadagin 4. desember kl. 16, vóru trý valevni uppstillað.

Tey eru:
Jan Højgaard, Toftir
Óli Jacobsen, Tórshavn
Dan Reinert Petersen, Fuglafjørður

Nú skal valið fyrireikast, og aftaná hálvan desember verða atkvøðuseðlar sendir út. Teir verða antin bornir út av sóknarformanninum á staðnum ella sendir við postinum, sum greitt frá í reglugerðini fyri valið, sum er endurgivin aðrastaðni í blaðnum.

Teir, sum hava valrætt, eru teir, sum hava verið til skips undir okkara sáttmála í 2005 ella 2006, og/ella sum hava goldið limagjald fyri hesi árini. Limir í sjómannadeildini hava eisini valrætt sambært somu reglum.

Hetta merkir sum høvuðsreglu, at allir umborð uttan skiparin hava atkvøðurætt.

Atkvøðuseðlarnir skulu sendast grannskoðara felagsins, sum eisini stendur fyri uppteljingini og eftirlitinum við, at innkomnar atkvøður eru gyldugar.

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569

# Framløga av bókini um Júst

Mánadagin var framløga í Miðlahúsinum av bókini um Júst í Túni, sum Helgi Jacobsen hevur skrivað. Vit hava ikki havt tíð at lesa hana enn, men vit sum vita um Júst vit, at hann umboðaði ein spennandi part av okkara fiskivinnusøgu, og fara vit at koma aftur til bókina í komandi blaði. Vit vóru sjálvsagt til staðar við framløguni og kunnu vísa nakrar myndir, sum fyrst og fremst er av ættini hjá Júst og teimum, hann sigldi saman við.



*F.v. Jóannes, bróðursonur Júst, Símun og frammanfyri hann Andrias, synir Júst.*



*Júst hjá Andrias.*



*Júst hjá Honnu*



*Hetta er yngra ættarliðið. Bárur hjá Marjun hjá Júst saman við soninum Dávur John.*



*Eyðun Mikkelsen, Sandur, sigldi við Sildrekanum.*



*Hesir hava allir siglt saman við Júst. F.v. Jóhannes Martin Olsen, Ivan Johannesen og Jákup Petur Jacobsen úr Fuglafirði.*



*Maja, kona Júst, saman við verdóttrini Fíu, hm. og dóttrini Sonnu hinumegin.*



*Petur Jakku av Skála, sigldi eisini saman við Júst. Her saman við konuni Sonja.*



*Marni hjá Almu saman við fastur síni Lis, sum er seinasta av systkjunum hjá Júst, sum er eftir á lívi.*



*Hanna hjá Júst.*